| | Býráðsfundur<br>26. oktober 2017 | Blað nr.: 1<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 26. oktober 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Ingunn Eiriksdóttir
Sigurð Ó Vang
Rita Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2017 | Blað nr.: 2 | |
| | Formansins merki: | |

## Innihaldsyvirlit

**Síða**

### Til viðgerðar


| | | | |
|---|---|---|---|
| 231/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 4 |
| 232/17 | 17/02568-4 | Góðkenning av leigusáttmála um grunddøki fyri egningarskúr við bátahylin á Argjum. | 5 |
| 233/17 | 14/01389-16 | Útstykking Kaldbak - sølustøða. | 6 |
| 234/17 | 17/01975-1 | Sølan av ognini matr. nr. 538a, M. A. Winthersgøta 5, Tórshavn | 13 |
| 235/17 | 15/02204-10 | Fíggjarætlan – Býarbókasavnið | 15 |
| 236/17 | 15/04757-12 | KT-strategi fyri fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu | 18 |
| 237/17 | 16/04796-2 | Samferðslumálaráðið : Uppskot broyting í koyrikortskunngerðini (prutl) o.a. | 21 |
| 238/17 | 17/01304-1 | Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi | 25 |
| 239/17 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 30 |
| 240/17 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 34 |
| 241/17 | 14/04894-3 | Velbastaðvegur – Kirkjubøvegur, um broyting av gøtunøvnunum | 38 |
| 242/17 | 17/03060-1 | Leigumál til heilsu- og umsorganartænastuna, heilsuhús | 40 |
| 243/17 | 17/02826-2 | Rakstur av fimleikahøllini í Hoyvíkar skúla | 42 |
| 244/17 | 17/02043-2 | Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2017 til 2020 | 44 |
| 245/17 | 16/04312-1 | Skoytubreytin | 45 |
| 246/17 | 15/00485-33 | Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700) | 50 |
| 247/17 | 16/01810-1 | Ferðavinnupolitikkur | 55 |
| 248/17 | 17/01619-1 | Fíggjarætlan 2018 | 58 |
| 249/17 | 17/02741-1 | Kommunuskúlagarðurin | 68 |
| 250/17 | 17/02864-1 | Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri | 70 |
| 251/17 | 17/02930-1 | Grótið frá Sandoyartunlinum | 72 |
| 252/17 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 74 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 253/17 | 17/03355-1 | Setanarheimild í Tórshavnar kommunu | 76 |
| 254/17 | 17/03256-1 | Fyrisitingarstjórin sigur seg úr starvi | 78 |

## ***231/17 Mál beind í nevndir 2017***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 92/17 | 17/00041-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 117/17 | 17/00041-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 135/17 | 17/00041-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 157/17 | 17/00041-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 202/17 | 17/00041-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 231/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 232/17 Góðkenning av leigusáttmála um grundøki fyri egningarskúr við bátahylin á Argjum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 02.10.2017 | 53/17 | 17/02568-4 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 232/17 | 17/02568-4 |

**Málslýsing:**
Við samanleggingini av Argja- og Tórshavnar kommunu, yvirtók Tórshavnar havn umsitingina av leigumálunum viðvíkjandi grundøkinum undir egningarskúrunum við bátahylin á Argjum.

Tað eru 6 skúrar tilsamans, har verandi leigusáttmálar eru ógreiðir, bæði fyri leigara og útleigara.

Ásmund Olsen hevur keypt ein av skúrunum, og ynskir at fáa eina átekning um hetta á leigusáttmálan.

Av tí at verandi leigusáttmáli er ógreiður, er uppskot gjørt til nýggjan 10 ára leigusáttmála, har egningarskúrurin framhaldandi skal brúkast til egning.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við uppskoti til leigusáttmála.

**Vinnunevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 233/17 Útstykking Kaldbak - sølustøða.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 64/16 | 14/01389-16 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 165/16 | 14/01389-16 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 203/16 | 14/01389-16 |
| 4 Kaldbaksnevndin | 24.10.2016 | 7/16 | 14/01389-16 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 3/17 | 14/01389-16 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 151/17 | 14/01389-16 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 162/17 | 14/01389-16 |
| 8 Kaldbaksnevndin | 20.06.2017 | 6/17 | 14/01389-16 |
| 9 Kaldbaksnevndin | | | 14/01389-16 |
| 10 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 225/17 | 14/01389-16 |
| 11 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 233/17 | 14/01389-16 |

**Málslýsing:**
**Útstykking Kaldbak - Sølustøða.**

Útstykkingin í Kaldbak umfatar í alt 10 sethúsagrundstykkir. Fermeturprísurin er kr. 793,51.

Grundøkini eru matrikuleraði fyri góðum 2,5 árum síðani, men eru enn bert 4. stykkir seld.

Ein av eigarunum ynskir at lata stykkið innaftur, og er í løtuni bert ein møguligur áhugaður keypari til eitt av stykkjunum.

Í sølutilgongdini hevur tað eisini víst seg, at áhugi var at keypa tey 4 uttastu stykkini ( tey sum liggja móti bygdini ) tí her var minni jarðarmunur.

Útstykkingin er annars sera trupul, tí talan er um sera stóran jarðarmun, og er tí talan um dýra og tekniskt trupla byggibúning, samstundis sum fermeturprísurin er høgur.

Jarðarmunurin verður størri longur inni, og er byggibúningarkostnaðurin tískil hægri, longur inni móti kaldbaksfirði.

Ein møgulig loysn kundi tí veri at kommunan átók sær at gera grundøkini byggibúgvin.

Trupulleikin er tó at stykkini tá vildu gjørst enn dýrari.

Ein kanning av møguligum byggibúningarkostaði eigur at vera umhugsað.

Annar møguleiki er at lýsa stykkini til sølu, til marknaðarprís. Í hesum føri verður marknaðarprísurin mettur at vera lægri enn kostprísur.

Kommunan kann í eini sølutilgongd áseta ein mettan minstaprís.

**Dømi:**

Um kommunan selir stykkini fyri kr. 550 fermeturin ( sum kann vera minstiprísur )

Talan er um í alt. 5.164 fermetrar á kr. 793,51 = kr. 4.097.685,64

| | | | |
|---|---|---|---|
| Harav eru seldir | 1.590 fermetrar á kr. 793,51 = | kr. | 1.633.043,58 |
| = | útlegg | kr. | 2.464.642,06 |

Um øll stykkini verða seld fyri kr. 550,00 fermeturin, fær útstykkingin eitt hall á kr. 1.257.486,64 ( Herav endurgjald til teir 4. verandi eigararnar í alt kr. 501.143,58 )

Um teir 4. eigararnir verða hildnir uttan fyri verður hallið kr. 756.343,06

Um stykkini vera seld í fríðari sølu, verður mett at stykkini fáa ymiskan prís, samstundis sum onkur stykki framvegis ikki verða seld.

Umsitingin er í iva um hvat gerast skal. Vanligt er at selja stykkini í eini skipaðari útstykking til kostprís, og til teir møguligu keyparar sum standa á bíðilista til sethúsagrundøki.

Í hesum føri hevur tað ikki eydnast at selja stykkini eftir bíðilista, og heldur ikki nú stykkini hava ligið í fríðari sølu til fastan prís.

Tað er okkara metan at stykkini eru ov dýr, samstundis sum tey eru trupul og dýr at gera byggibúgvin

Trupult er at áseta marknaðarprísin sum væntandi eisini í hesum føri kann gerast lægri enn uppstillaðu kr. 550 pr. fermeturin.

Um kommunan velur at selja stykkini til marknaðarprís, er spurningurin eisini um kommunan er moralskt bundin fyri teimum keyparum sum frammanundan longu hava ognað sær eitt stykki til kostprís.

Løgdeildin metir ikki at kommunan er juridiskt bundin at gomlu keyparunum, tí talan er um endaligan handil, har keyparin til tá kendar fortreytir keypir eitt grundøki til ásettan prís.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at fíggjarnevndin umrøður málið.
Skal kommunan

1. Lýsa stykkini til sølu í fríðari sølu til marknaðarprís.
2. Kanna møguligan byggibúningarkostnað.
3. Gera byggibúning lidnað og selja til kostprís.
4. Gera byggibúning lidnað og selja til marknaðarprís
5. Um stykkini verða seld til marknaðarprís. Vil kommunan tá endurrinda verandi eigarum ein møguligan mun millum kostprís og marknaðarprís. Og hóast mett verður at kommunan ikki er juridiskt bundin at einum endurgjaldi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**

Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyristingarstjórin mæla til at lýsa tey óseldu stykkini í fríðari sølu til marknaðarprís.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til, at grundøkini hava verið boðin til sølu á bíðilistanum hjá kommununi, men at áhugi ikki er til staðar at ogna sær grundøkið, verður mælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum og lýsa grundøkini til sølu í fríari sølu, og verða tey seld, um hóskandi boð fæst.

**Býráðið 2. mai 2012:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**Ískoyti.**
Inni hevur fingið uppgávuna at selja grundøkini í Kaldbak. tó við fyrivarni um, at býráðið skal góðkenna søluna av hvørjum einstøkum grundøki.

Eigararnir av tveimum óbygdum grundøkjum hava gjørt vart við, at samtyktin í býráðnum um at selja grundøkini í fríðari sølu hevur ta fylgju, at teirra grundøki fáa lægri virði.

**Matr. nr. 22aa, Kaldbak. Eigari, Rúni Hvannastein**. Vídd á grundøki 520 m². Keypsprísur. kr. 412.625,20

Rúni hevur fyri góðum ári síðani heitt á kommununa um at taka stykkið inn aftur fyri keypsprís. Kommunan hevur havt stykkið á sølulista, men er stykkið framvegis ikki selt.

Síðani hevur kommunan samtykt at selja stykkini í fríari sølu, og eru møguleikarnir fyri at kunna selja hansara stykki fyri upprunaprís lítlir og ongir. Rúni vísir á, at samtyktin ger hansara støðu verri, tí ongin fer at keypa hansara stykki fyri kostprís, um hini óbygdu stykkini verða seld fyri lægri prís.

**Matr. nr. 22t, Kaldbak. Eigari, Petur Nolsøe.** Vídd á grundøki 525 m². Keypsprísur kr. 416.592,75

Petur hevur fyri stuttum keypt stykkið. Hann hevur gjørt sáttmála við Norðsetur, og hevur eisini fingið byggiloyvi.

Talan er um eina trupla útstykking. Grundøkini eru dýr, og er talan um dýra byggibúning, tí útstykkingin liggur í lendi við stórum hæddarmuni.

Um kommunan samtykkir at taka stykkini inn aftur, hava omanfyri nevndu eigarar saman við øðrum áhugaðum møguligum keyparum møguleika til at keypa egin stykki aftur.

**Tilmæli:**
Vísandi til at talan er um eina trupla og dýra útstykking, mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at keypa óbygdu stykkini aftur fyri kostprís.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti 29. august 2012.**

Nakrir eigarar av ábygdum sethúsa grundøkjum í útstykkingini hava í brævi 10. juli 2012 (2012-1733/1), vent sær til kommununa.

Teir vísa til býráðssamtyktina 2. mai 2012, og ynskja at fáa afturgoldið tann munin sum stykkini verða seld fyri í dag, og tann prís sum teir keyptu stykkini fyri. Teir meta at talan verður um umleið kr. 200.000,00 hvør, ella umleið kr. 800.000,00 í alt.

Býráðið samtykti 2. mai 2012 at selja óseldu stykkini til hægstbjóðandi.

Grundøkini eru ábygd, og eru stykkini eisini leys av øllum kommunalum bindingum viðvíkjandi víðarisølu.

Hesir eigarar hava eins og allir aðrir eigarar av grundøkjum við ábygdum sethúsum í kommununi, eina ogn sum kann seljast til marknaðarvirði, og er teirra grundøki partur av samlaða virðinum.

Kommunan kann ikki endurrinda eigarum av ábygdum sethúsa grundøkjum endurgjald og hevði tað um so var ikki verið í tráð við rættarnormin um, at myndugleikar ikki mugu geva ávísum borgarum framíhjárættindi í mun til aðrar.

**Tilmæli:**
Mett verður at kommunan hevur ikki heimild til at endurrinda eigarunum av ábygdu grundøkjunum munin millum keypsprís og møguligan søluprís av grundøkjunum í dag, og mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til ikki at ganga umbønini á møti.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini siga at prísurin á ognartorginum á torshavn.fo er ikki dagførdur. Gott var um stykkini vóru lýst við røttum prísi.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:** Limirnir í staðbundnu nevndini skjóta upp, at bjóða Bústaðir óseldu økini. Møguligar broytingar í byggisamtyktini vóru eisini umrøddar.

**Ískoyti 03.02.2016.**
Útstykkingin umfatar í alt 10 grundstykkir. 6 omanfyri og 4 niðanfyri vegin.

Bert eitt grundstykkið omanfyri vegin er selt, meðan trý grundstykki sum liggja niðanfyri vegin, eru seld. Talan er sostatt um 4 seld grundstykkið í býlinginum. Sethús eru bygd á hesi fýra grundstykkini. Viðmerkjast kann, at sethús eru bygd á hesi 4 grundstykkini, og hevur ein av uppruna eigarunum selt sítt grundstykkið við ábygdum sethúsum.

Teir 4. uppruna eigararnir hava í skrivi 12.02.2014 (Skjal 14/01389-15) vent sær til kommununa, har teir vísa sína ónøgd við, at kommunan nú selur grundstykkini fyri kr. 200.000,00 og ynskja hesir keypara, at verða javntstillaðir við komandi keyparar.

Grundstykkini hava ligið á sølulista hjá INNI síðani juli 2012 við einum prísuppskoti á kr. 200.000 men eru ongi grundstykki seld síðani tá.

Inni hevur nú móttikið eitt boð áljóðandi kr. 200.000,00 (sí mál nr. 15/04699).

Kostprísur fyri grundstykkið er 411.832,- og er innkomið boð kr. 211.832,- lægri enn kostprísur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til ikki at selja grundstykkið fyri innkomið boð áljóðandi kr. 200.000.

Mælt verður til at taka grundstykkini av aftur sølulistanum hjá Meklara, og at grundstykkini koma at standa á sølulista hjá kommununi til kostprís.

Mælt verður samstundis til, at beina málið í byggi og býarskipanarnevndina, við atlitið til at endurskoða útstykkingina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Umrøtt og beint aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Umrøtt.

**Kaldbaksnevndin 24. oktober 2016:** Nevndin samtykti at biðja um at fáa umboð fyri Bústaðir á fund í kaldbaksnevndina um framtíðar bústaðir í Kaldbak.´

**Ískoyti:**
Umboð frá umsitingini kemur inn at greiða frá málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Umrøddir vóru ymiskir møguleikar. Ein møguleiki er at sláa grundstykkini saman og eitt nú selja tað til Bústaðir. Ein annar møguleiki er at selja stykkini til marknaðarprís og fáa eina kostnaðarmeting.

**Ískoyti:**

Grundstykkini í útstykkingini Við Krossá í Kaldbak, hava staðið á sølulista hjá kommununi síðani 2009.

Í útstykkingini eru 10 grundstykki, og eru 4 higartil seld, meðan hini 6 grundstykkini framhaldandi liggja óseld.

Grundstykkini eru  óútgrivin. Avbjóðingar eru í lendinum, soleiðis at tað er rættuliga umfatandi og dýrt at planera stykkini.

Kommunan hevur biðið tveir meklarar um at virðismeta stykkini.
Onnur metingin kom inn áðrenn skráin fór út.

Betri heim metir søluvirðið fyri matr. nr. 22s til kr. 250.000,00 og hini matriklini, 22v,22x,22y,22z, og 22aa til kr. 150.000,00 pr. stk.

Skyn hevur mett virðið av grundstykkjunum til kr. 500 kr. fermeturin, svarandi til ein mettan søluprís í alt á kr. 1.550.500,00

Um vit selja grundstykkini fyri ein miðal metingarprís ( SKYN kr. 500 + miðjal INNI kr. 323 ) verður miðal fermeturprísurin kr. 411,5 og verður samlaði søluprísurin fyri útstykkingina í síni heild tá 1.276.061,50

Bókað útlegg er kr. 2.125.393.  – mettan søluprís kr. 1.276.061,50 og restútlegg 849.331,50

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mælir til at lýsa grundstykkini til sølu fyri í  minsta lagi prísuppskot sambært meting, og at fíggja restútlegg kr. 849.331,50 yvir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur).

**Kaldbaksnevndin 20. juni 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at Tórshavnar kommuna fer í samráðingar við Bústaðir um møguleiki er at byggja íbúðir á stykkinum omanfyri vegin. Um hesar samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turid Horn samtykkja at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at fara í samráðingar við Bústaðir um at byggja íbúðir á stykkinum omanfyri vegin. Um hesar samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at núverandi eigarar í útstykkingini ikki verða viðgjørdir undir somu treytum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndni, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti.**

Grundstykkið matr. nr. 22s, Kaldbak  ( við Krossá 5 ) hevur staðið á sølulista hjá BetriHeim í góðan mánaða.

Meklarin boðar frá, at innkomið er eitt boð á kr. 215.000,00 og at boðgevingin er støðgað.

**Tilmælið:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja grundstykkið fyri innkomið boð kr. 215.000,00

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at grundøkini í útstykkingini ikki eru seld fyri einsljóðandi prís.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

# 234/17 Sølan av ognini matr. nr. 538a, M. A. Winthersgøta 5, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 152/17 | 17/01975-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 164/17 | 17/01975-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 209/17 | 17/01975-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 245/17 | 17/01975-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 226/17 | 17/01975-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 234/17 | 17/01975-1 |

**Málslýsing:**

Ætlanin er at selja ognina M. A. Winthersgøta 5, Matr. nr. 538a, Tórshavn.
Grundstykkið er 172m2. Ábygdur er bygningur í 3 hæddum.
Bygningurin er ikki í góðum standi.

Kvøldskúlin brúkar bygningin, men flytir skjótast gjørligt sítt virksemið í onnur hølir.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla býráðnum til at lýsa ognina til sølu til hægstbjóðandi, so skjótt sum kvøldskúlin hevur flutt sítt virksemi úr bygninginum.

Víst verður til samtykt í fíggjarnevnd 14. Juni 2017. Mál 17/01875.

**Ískoyti:**
Sí Notat til mál 17-01975 Sølan av ognini matrnr 538a og Frágreiðing viðvíkjandi bygningunum hjá kvøldskúlanum í MAW 1-3-5.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina til ummælis.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur biðið leiðaran á Kvøldskúlanum um ummæli í málinum. Sí hjálagt.

Áður er mett at ein høvuðsumvæling av bygninginum M.A. Winthersgøta 5 vil kosta upp til umleið 4 mio.kr, tó so at tað kann gerast stigvíst. Avbjóðing við at selja bygningin er m.a. at neyðugt verður at gera ein brunavegg og evt. atlit til lyftu til sambygda bygningin í M. A. Winthersgøtu 3.

Annað uppskot vildi verið at selt bygningin í M. A. Winthersgøtu 1, sum júst er høvuðsumvældur og brúkt peningin uppá høvuðsumvæling av bygningi í M. A. Winthersgøtu 5.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at tilmæla fíggjarnevndini antin at:

1. selja bygningin í M. A. Winthersgøtu 1 og brúka peiningin uppá høvuðsumvæling av M. A. Winthersgøtu 5
2. selja bygningin í M. A. Winthersgøtu 5
3. Selja bygningin í M. A. Winthersgøtu 1

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at selja bygningin í M. A. Winthersgøtu 5 og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mælir frá at selja bygningin vísandi til, at Kvøldskúlin kann nýta bygningin og av tí at hann ikki lýkur brunakrøv v.m.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Tikið av skrá.

# <u>235/17 Fíggjarætlan – Býarbókasavnið</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 251/17 | 15/02204-10 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 247/17 | 15/02204-10 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 235/17 | 15/02204-10 |

**Málslýsing:**
Býarbókasavnið hevur eina røð av tænastum, ið ávíst minni tænastugjald verður kravt fyri, umframt sektir fyri ikki at lata inn tilfar til tíðina og um tað er burturmist.

Sí nærri á talvuni niðanfyri og har samanbering samstundis er við Landsbókasavnið og bókasøvn í Keypmannahavn.

Mælt verður til at býarbókavørðurin framhaldandi kann áseta gjøldini fyri tænastur, tó ikki sektir fyri ikki at lata inn til tíðina og endurgjald fyri burturmistar bøkur.

**Gjøld, ið Býarbókasavnið krevur.**

| **Býarbókasavnið** | **Landsbókasavnið** | **Københavns kommunes Bibl.** |
|---|---|---|
| **<u>Avrit</u>**: | | |
| A5 – 0,50 kr. lit: 2,50 kr. | 1 kr. | - |
| A4 – 1 kr. lit: 5 kr. | 1 kr. / 5 kr. | 2 kr. |
| A3 – 2 kr. lit: 10 kr. | 2 kr. / 10 kr. | 4 kr. |
| | | |
| **<u>Laminering</u>**: | | |
| A5 – 2 kr. | - | - |
| A4 – 3 kr. | - | - |
| A3 – 5 kr. | - | - |
| | | |
| **<u>Fax</u>**: 2 kr. fyri síðuna | 2 kr. | - |
| | | |
| **<u>Glæra</u>** kostar 5 kr. + kopiering | - | - |
| | | |
| **<u>Spiral innbinding</u>**: spiral 10 kr. | - | - |
| Spiral + for- og baksíðu 20 kr. | - | - |
| | | |
| **<u>Lánarakort</u>**: 30 kr. | 50 kr. | - |
| | | |

| | | |
|---|---|---|
| **<u>Burturbeindar bøkur</u>** til sølu: úr 2 kr. – 20 kr. | - | 10 kr. |
| | | |
| **<u>Sektir</u>**: 20, 40 og 80 kr. | 20, 40 og 100 kr. | Vaksin: 20, 120, 230<br>Børn: 10, 55, 120 |
| | | |
| **<u>Endurgjald fyri burturmistar bøkur</u>**, filmar o.a, har krevja vit innkeypsprísin + 80 kr. í umsitingargjaldi. | Endurgjald fyri burturmistar bøkur, filmar o.a, har krevja vit innkeypsprísin + 100 kr. í umsitingargjaldi. | Ymsar upphæddir frá 85 kr. til 1.050 kr., treytað av, hvat slag av tilfari, talan er um. |

Sektirnar eru ikki broyttar síðani 2008. Mælt verður til at hesar verða hækkaðar nakað soleiðis tær í størri mun avspeglað kostnaðin av at senda út skriv, bóka v.m.

Mælt verður til at sektirnar framyvir vera 20 kr./ 70 kr. og 140 kr.

Endurgjaldið fyri burturmistar bøkur verður ásett til 140 kr. í umsitingargjaldi + innkeypsprísin.

Gjøld, bøtur o.a. verður uml. 110 tkr. í 2016. Við hesi broyting verður roknað við at inntøkurnar økjast nakrar 10 tkr. Tó fremsta endamálið er at fáa bøkurnar í umfar soleiðis at flest møguligt fáa gagn av teimum. Eisini skal nevnast at tað er lætt at endurnýggja lán á netinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at sektirnar framyvir vera á.v.v. 20/70/140 kr. fyri 1, 2 og 3 rykkjara. og 140 í umsitingargjaldi umframt innkeypsprísin. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Halla Samuelsen

# 236/17 KT-strategi fyri fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 155/16 | 15/04757-12 |
| 2 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 306/16 | 15/04757-12 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 163/17 | 15/04757-12 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 203/17 | 15/04757-12 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 235/17 | 15/04757-12 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 230/17 | 15/04757-12 |
| 7 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 236/17 | 15/04757-12 |

**Málslýsing:**

Á fundi í mentamálanevndini 7. desember 2015 var kunnað um ætlanir um gera eina KT-strategi og –atgerðarætlan fyri fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu.
Fyrsti parturin, ið er at gera eina støðulýsing er nú klárur til hoyringar. Skjalið er gjørt við støði í umfatandi upplýsingum frá skúlunum, umframt verkstovu saman við skúlaleiðslum og KT-vørðum.

Næsta stig verður at gera eina framtíðarætlan fyri KT og verður ein nýggj verkstova um tað miðjan juni. Eisini er ætlanin at fara í dialog við KT-vinnuna um evnið.

Hjálagt er fylgiskjal 1 – Uppskot til KT-strategi og -atgerðarætlan fyri fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu.

Á fundinum fer umsitingin at gjøgnumganga nøkur útvald áhugavert høvuðspunkt frá uppskotinum. Ætlandi kemur endaligt uppskot til viðgerðar í nevndini í september 2016.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Útkast til rit er nú klárt til víðari viðgerð. Sí hjálagt. Ætlandi verður ritið nú sent til hoyringar hjá skúlaleiðslunum og hareftir hjá skúlastýrunum. Eisini er ætlanin at hava ein fund við KT-vinnuna um ætlanirnar. Henda tilgongd kemur ætlandi at taka umleið 2-3 mánaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við, at umsitingin sendir ritið til hoyringar hjá skúlunum og fyrireikar eina endaliga frágreiðing til viðgerð í nevndini.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá skúlum, skúlastýrum, Námi, Heim&skúli v.fl.

Ein høvuðsavbjóðing fyri at avsluttað arbeiðið við ritinum er, at MMR júst hevur broyt mannagongdina viðv. uppgerð av grundarlagnum fyri, hvussu tímanormurin til KT-vørðar verður útroknaður. Hetta inniber sum útgangsstøði broyttar fyritreytir fyri kostnaðarbýtinum millum MMR og TK innan KT-stuðul og røkt ella má innibera at brúk av KT í nøkrum skúlum má umleggjast.

Avtalað er á fundi við MMR, at tey fáa høvi til at viðmerkja uppskotið og verður fundur aftur um 2 vikur um uppritið og við atliti til at tryggja støðug viðurskifti kring KT-røktina á teimum skúlunum, ið serliga hava lagt seg eftir brúk av KT.

Samstundis er talan um ein markamótsspurning, ið eisini lutvist má viðgerast felagskommunalt gjøgnum Kommunufelagið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við endaligari frágreiðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Uppskot til KT-strategi og –atgerðarætlan er nú klárt til endaliga viðgerð. Sí hjálagt rit.

Spurningurin, sum var viðgjørdur seinast viðvíkjandi tímanormi til KT- vørðir, er ikki loystur, men er tó ikki til hindurs fyri, at hetta ritið nú verður viðgjørt og verður eitt alment skjal, ið liggur til grund fyri viðgerð og brúki av KT í fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu, og sum grundarlag fyri samskifti við landsmyndugleikarnar innan økið.

Á fundinum greiðir umsitingin frá høvuðspunktum í frágreiðingini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjáløgdu strategi. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 237/17 Samferðslumálaráðið : Uppskot broyting í koyrikortskunngerðini (prutl) o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.01.2017 | 4/17 | 16/04796-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 186/17 | 16/04796-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 198/17 | 16/04796-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 226/17 | 16/04796-2 |
| 5 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 209/17 | 16/04796-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 259/17 | 16/04796-2 |
| 7 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 237/17 | 16/04796-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.10.2017 | 253/17 | 16/04796-2 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið til hoyringar uppskot um kunngerð um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru. Sbrt. uppskoti til § 46 c skulu kommunurnar syrgja fyri frálæru í ferðslureglum og koyrivenjing við lítlum prutli sbrt. lógini um frítíðarundirvísing.

Prutlfrálæran verður løgd til rættis við í minsta lagi 27 skúlatímum, har hvør tími í minsta lagi varir 45 minuttir. Prultfrálæran skal fevna um í minsta lagi 15 skúlatímar í ástøði og fatan av vandaviðurskiftum og í minsta lagi 12 skúlatímar í verkligari koyrifrálæru (venjingarakstur). Sí uppskot til kunngerð í politikkaraportalinum (serliga s. 6 og s. 16).

**Tal av næmingum**
Bólkurin, sum hevur gjørt lógarfyrireikandi arbeiðið metir, at talið av 15-ára gomlum, sum fara at taka lítla koyrikortið til prutl fer at liggja um 300, sum svarar til helmingin av einum meðal árgangi.
Talið av 16-ára gomlum, sum hava tikið prutlkoyrikort hevur seinastu 3 árini verið:
2014 135 næmingar
2015 95 næmingar
2016 93 næmingar
Bólkurin metir, at tá tey ungu eru blivin 16 ár, er tað ikki longur áhugavert at koyra prutl.

**Næmingagjald**
Næmingagjaldið fyri skeiðið er roknað soleiðis:
Byrjunargjald á 360 kr. + 27 tímar á 6 kr. = 522 kr. í næmingagjaldi.

**Kostnaðarlig viðurskiftum millum Kvøldskúlan og Mentamálaráðið**
Undirvísingin kemur undir almenna frítíðarundirvísing sbrt. lógini. Parturin hjá Kvøldskúlan og Mentamálaráðið blívur um 18 næmingar eru á einum holdi:
15 tímar x 292,31 kr. = 4384,65 kr. fyri ástøðiliga partin

36 tímar x 292,31 = 10523,16 kr. fyri venjingaraksturin (6 næmingar á hvørju akstursholdi)

Tilsamans 14907,81 kr., sum skúlin og mentamálaráðið gjalda 50%/50% (7453,91 kr.).

**Skeið til undirvísarar (leiðreglur frá Rådet for Sikker Trafik)**
Neyðugt er at fáa til vega undirvísarar, ið lúka neyðugu krøvini. Skeið til lærarar er hvørt heyst í DK (næsta skeið heystið 2017). Skeiðið er eitt vikuskifti. Leygar- og sunnudag 9.30 –

21.30 og 8.30 – 16.00. Skeiðið kostar 7900 kr. inkl. kost og logi. Afturat hesum skulu leggjast ferðakostnaður og dagpengar (TKUL hava min. 3 undirvísarar). Annar møguleiki er at fáa skeiðshaldara til FO, og vil hetta allarhelst verða bíligari.

**Venjingarakstur**
Skal fara fram á stongdum øki á 40 x 100 metur í uml. 2-4 tímar. Restin á alfaravegi. Í mesta lagi 6 næmingar í senn. Møguleiki hjá næmingunum at hava egið prutl við og skal skúlin lata næminginum loyvi til koyring millum heim og undirvísingarstað. Skúlin fær ymiskar útreiðslur í hesum sambandi t.d.serligir vestar til venjingarakstur, keylir at seta á venjingarbreytina, tráðleyst telesamband millum undirvísara og næmingar, goymslurúm til prutl og útgerð til undirvísaran, trygging v.m. Í fall hetta kemur í gildi er ætlanin at krevja at næmingar hava egið prult.

**Frálæra í 1. Hjálp**
Næmingarnir skulu hava staðið 4 tíma frálæru í 1. hjálp í ferðsluni fyri ungar prutlførarar. Ikki er álagt kommununi at skipa fyri hesari. Aðrir veitarir eru á marknaðinum.

**Eginváttan um heilsu**
Næmingarnir skulu harumframt hava eginváttan um heilsu fyri at sleppa at luttaka, ið teir sjálvir rinda fyri.

Vanlig koyriundirvísing og venjingarakstur er í Føroyum vanliga skipað hjá privatum koyrilærararum. Sum sæst eru fyrst og fremst útreiðslur av at fáa til vega útgerð v.m. meðan næmingagjøldini vilja dekka munandi av undirvísingar- og akstursvenjingarútreiðslunum, tó ikki umsiting o.a..

**Tilmæli**
Trivnðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til hvørt kommunan skal antin
a). Taka jaliga undir við uppskotinum til kunngerð og taka við uppgávuni ella
b). Mótmæla uppskotinum og mæla til at uppgávan verður løgd til vanligu koyriskúlarnar.

**Mentamálanevndin 11. januar 2017:** Samtykt at mótmæla uppskotinum og mæla til at uppgávan verður løgd til vanligu koyriskúlarnar.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur hósdagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**

Síðani seinastu viðgerð í mentamálanevndini hevur landstýrismaðurin í samferðslumálum sett í gildi kunngerð um koyrikort. Í mun til uppskotið, ið var til hoyringar eru nakrar broytingar gjørdar. Her serliga, at nú ásett at nú kann bæði vera talan um privatan ella kommunal veitara (§ 46c.).

Umsitingin hevur samskift við Tórshavnar Kvøldskúla um viðurskiftini kring møguliga koyrifrálæru. Sí hjáløgdu frágreiðing.

Kvøldskúlin hevur víst á ávís viðurskifti og fyritreytir fyri at skúlin kann veita koyrifrálæru.

- Sum heild endurrindar Mentanmálaráðið í verandi støðu ikki fult út í mun til skeiðsskánna hjá Kvøldskúlanum. Enn er óvist hvat MMR avsetur til frítíðarundirvísing komandi kalendaraár og tí ikki óhugsandi at alt annað líka at Kvøldskúlin kemur at rinda at kalla allar útreiðslurnar, bæði fyri tól og amboð og undirvísing. Samanlagt verður mett at uppstartskostnaðurin er uml. 50 tkr., um næmingarnir hava egið prutl við. Hartil kemur óvissa viðv. trygging. Hetta verður kannað. Gingið verður út frá at foreldur tryggja prutlið meðan koyrivenjing fer fram og viðv. koyring til og frá bústaðnum til venjing.

- Annað er atlitið til kapping millum Kvøldskúlan og privatar koyrirlærarar. Skúlin hevur kannað viðurskiftini og kann staðfesta at veitararnir ikki eru so áhugaðir, m.a. tí hetta verður sera tíðarkrevjandi, serliga venjingaraksturin, og torført hjá koyrilærarunum at taka uppá seg afturat vanligu koyrifrálæruni. Koyrilærarin var sera ónøgdur við lógina, sum hann helt skuldi verið endurskoða øll sum hon er.

- Viðv. undirvísarum er ein fyritreyt at slíkir fáast til vega. Kommunufelagið hevur møguliga í hyggju at skipa fyri einum skeiði í Føroyum soleiðis at tað samanlagt kann vera bíligari at fáa fleiri undirvísarar til tørvin kring landið. Óansæð vil hetta hava ávísar útreiðslur við sær.

- Í fall tilboðið ferð í gongd hugsar Kvøldskúlin sær at gera samstarv við Eysturskúlan, har tað eru lærarar frá skúlanum, ið undirvísa, at hava goymslu og undirvíngarhøli, umframt brúka skúlagarðin til byrjandi venjingarakstur. Umframt er ætlanin at hava venjingarkastur á parerkingsøkinum við Skúlan á Argjahamri ella við skýlið við ovara vøll í Gundadali.

- Ávís umsiting er eisini av tilboðum og skal tað eisini loysast.

Mett verður fyribils at tilboðið kann fara í gongd í heyst ella við ársbyrjan komandi ár treytað av undirvísarum og fígging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um Tórshavnar kvøldskúli skal fara undir at veita koyrifrálæru til prutl.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til undanfarna mentamálanevndarfund, ið nevndin verður at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Nevndin vísir til mótmæli hennara frá fundinum 11. januar 2017, men samtykkir at heimila kvøldskúlanum at veita hesa fráløru og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í mentamálanevndina visanti til, at hetta er ein landspolitisk uppgáva, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu:
Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at senda Samferðslumálaráðnum mótmælisskriv at uppgávan er løgd til kommunurnar, men samtykkir nevndin at heimila kvøldskúlanum at veita hesa fráløru til 15 ára gomul og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 238/17 Flytilig áskoðarapláss o.a. í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 103/17 | 17/01304-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 135/17 | 17/01304-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 26.07.2017 | 190/17 | 17/01304-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.07.2017 | 166/17 | 17/01304-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.07.2017 | 188/17 | 17/01304-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 221/17 | 17/01304-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 229/17 | 17/01304-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 228/17 | 17/01304-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 228/17 | 17/01304-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 238/17 | 17/01304-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 262/17 | 17/01304-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan er væl í gongd við útbyggingina av Høllini á Hálsi við nýggjari høll afturat, umframt hølir til judo, borðtennis v.m. Umframt nýggjum stórum parkeringsøki, ið er tikið í nýtslu. Sí mál 14/04763.

Í teirri verkætlanini eru nakrar veitingar, ið eru sonevndar byggiharraveitingar, t.v.s. ikki partur av arbeiðstøkunum.Talan er um flytiliga áskoðarapláss (teleskop-tribunur), umframt mál, ljóðanlegg og máltalvur.

Verkætlanarbólkurin fyri útbyggingina hevur gjørt undankanning og viðgerð av viðurskiftunum. Inn er komin nøkur ref. tilboð. Við støði í teimum kann hugsast t.d. uml. 527 setur í hvørjum enda umframt uml. 148 setur í eystaru langsíðu, umframt part av verandi setrum. Tað gevur uml. 1500 setur, umframt nøkur standipláss. Tó ávíst fyrivarni fyri brunafarleiðum v.m.

Endasetrini liggja um kr. 3500 – 4000 setrið og síðusetrini uml. kr. 2500-3000 setrið. Tað gevur eina útreiðslu á uml. 4.4 mio.kr íroknað kommunalt mvg.

Hava eisini viðgjørt møguleikan at taka verandi síðutribunur burtur og er tað mett til uml. 1.000 tkr. (krevur detailprojekt) og so setur afturat. Hetta gevur fyrimunin at tilber at koma longri burtur frá bananum, har trygdarfrástøðan í dag er heldur tepur.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá málinum við støði tekningum.

Í byggiverkætlanini er ein pulja til ókent og í verandi støðu eru uml. tkr. 2.000 eftir, men enn er alt ov týðiliga at siga um nakað leypur av í teirri puljuni. Eisini hevur verið umrøddur møguleikin fyri at "selja" tribunur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um flytbar áskoðarapláss v.m. við atliti til møguligar fíggjarligar raðfestingar til 2018.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað og greinað málið víðari og fingið fleiri tilboð til vega

**Viðv. verandi áskoðaraplássum**
Sum heild verður mett, at tað er ein fyrimunur at fáa hesar tiknar niður og sett flytilig áskoðarapláss ístaðin. Tað gevur væl størri fleksibilitet í høllini og betri pláss, umframt at trygdin í sambandi við dystir gerst betri, tí at leikvøllurin ikki kemur eins tætt uppá áskoðararnar. Til dystir er frástøðan sum er ov tepur og krevur tað undantak frá galdandi reglum hjá EHF fyri altjóða dystir. Valið stendur í millum at gera arbeiðið nú í summar ella á sumri 2018.

Tilboð er komið uppá arbeiðið frá Suðuroyar Betongsaging Sp/f viðv. niðurtøkuni av verandi áskoðaraplássum og er á uml. 500 tkr. Hetta er nakað lægri enn áður mett, av tí at meðan arbeiðið uppá nýggju høllina er í gongd, ber í størri mun til at brúka størri amboð og at taka áskoðaraplássini út í størri pettum og soleiðis gera arbeiðið lættari og skjótari. Avbjóðingin er hinvegin, at um arbeiðið skal gerast er neyðugt at byrja innan 2-3 vikur fyri ikki at órógva virksemi í verandi høll í heyst. Onnur avbjóðingin er, at tá áskoðaraplássini eru tikin niður, vil ganga ein tíð í millum niðurtøkuna og til nýggj eru komin, tó so, at tað er hugsandi at onkrir fyribils pallar helst kunnu gerast, umframt at størri dystir annars mugu spælast í Hoyvíkshøllini ella Høllini í Kollafirði. Hartil kemur at gólvið skal gerast o.a. í tí sambandi. Hetta arbeiðið er mett til kr. 400 tkr.

**Viðv. kostnaði á flytiligum áskoðaraplássum**
Tilboðini, ið eru innheintaði higartil, eru at rokna sum fyribils tilboð so kommunan kann fáa eina hylling á kostnaðinum. Ætlanin er at fara í eitt formligt innboðið útboð sbrt. innkeypspolitikkinum hjá kommununi. Tað er hugsandi at útboðið vil geva nakað lægri prísir enn teir, sum eru komnir higartil, tó so at endaliga tilgongdin vil staðfesta tað nærri.

Fyribils verður mett, at setur í endunum av høllini kosta uml. 3300 kr./setrið og setur í síðuni á høllini uml. 2500 kr./setrið (tá íroknað sjálvt anleggið, setur, uppseting v.m.). Fleiri uppsetingar eru hugsandi, men t.d. kundu verið umleið 1050-1100 endasetur og umleið 600-800 síðusetur. T.v.s. ein samlaður mettur kostnaður á umleið 6.000 tkr.

Veitingartíðin til áskoðaraplássini er uml. 3 mánaðir, umframt uppseting á nakrar vikur, meðan niðurtøkan av verandi áskoðaraplássum er mett til uml. 2-3 vikur.
Ljóðanlegg, máltalvur og mál
Fyribils verður mett at hesi kunnu útvegast fyri umleið 300-400 tkr.

Fígging
Í verandi støðu ber ikki til at siga um nakað verður at leypa av í sambandi við arbeiðs-tøkurnar, ið eru í gongd í.s.v. útbyggingina av Høllini á Hálsi. Neyðugt verður við eykajáttan um henda verkætlan skal fremjast í ár. Tó er hugsandi, at veitingin av flytiligu áskoðaraplássunum kann fella hinumegin árskiftið.

Málið kemur fyri býráðið aftur, at taka av tilboði.

**Tilmæli**
Kommunustjorin, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a) at fara undir at taka niður verandi áskoðarapláss á eystaru síðu í verandi høll

b) at fara undir útboð av flytiligum áskoðaraplássum á.v.v. á norðaru síðu, sunnaru síðu og eystaru síðu.

c) at fara undir at heinta inn tilboð uppá máltalvur v.m.

d) at fíggja verkætlanin av konto 6175 - Umsiting og røkt av fastari ogn (íløgur)

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. juli 2017:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at veitingin verður boðin út alment og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. juli 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Kommunan hevur havt alment útboð av veiting av flytiligum áskoðaraplássum.
Inn komu fýra boð. Teirra boð vóru:

| | |
|---|---|
| Eikin/Unisport | 6.965.436 kr. |
| Inventartænastan | 5.600.000 kr. og alternativ 5.320.000 kr. |
| Laiderz | 5.876.841 kr. |
| Nema | 5.536.024 kr. |

Í útboðstilfarinum var ásett at mett verður um tilboðini við besta lutfall millum fylgjandi metingartættir:

a). Samlaður kostnaður - 70%
b). Dygd/funktión - 20%
c). Tænasta - 10%

Í sambandi við gjøgnumgongd av tilboðunum kom umsitingin eftir at tilboðini ikki í nøktandi mun vóru samanberilig. Tí var avgjørt at vita um veitararnir kundu lata inn tilboð uppá á.v.v. stól ella benkur av samanberiligari góðsku til áskoðaraplássini í endunum.

Allir 4 fingu møguleikan og lótu inn tilboð uppá samanberiligar stólar, ið góvu fylgjandi stig og samlaður kostnaður

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nema | 8,5 stig | - | 6.086.024 kr. |
| Laiderz | 10 stig | - | 4.927.880 kr. |
| Eikin/Unisport | 6,9 stig | - | 5.474.564 kr. |
| Inventartænastan | 8,4 stig | - | 5.289.936 kr. |

Bert 3 feløg lótu tilboð fyri benkur allastaðni og vóru tey:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nema | 9,3 stig | - | 5.000.000 kr. |
| Laiderz | 10 stig | - | 4.850.869 kr. |
| Inventartænastan | 8,2 stig | - | 5.159.270 kr. |

Hartil koma eyka plátur til seta undir áskoðaraplássunum í endunum fyri umleið 100.000.kr.

**Niðurtøka av verandi áskoðaraplássum og nýtt gólv**
Arbeiðstøkurnar eru mettar til 1.200.000 kr.

**Mál og máltalvur til nýggju høllina**
Mett til umleið 350.000 kr.

**Samanlagt**
6.577.880, umframt kommunalt MVG – tils. 6.989.000 kr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at kommunan fer undir endaligar samráðingar og gera sáttmála við Laiderz á í mesta lagi 4.927.880 kr., umframt áseta ein karm á 1.300.000 kr. til niðurtøku av verandi áskoðaraplássum, gólv vm. og áseta ein karm á 350.000 kr. til mál og máltalvur vm. Verkætlan á tils. 6.989.000 kr. íroknað kommunalt MVG verður fíggjað av konto 6175 *og flutt á projektkonto L57003.* Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

## 239/17 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224

áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020 .

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | Ár 2010 | Ár 2015 | Ár 2018 | Ár 2020 | Ár 2025 | Ár 2030 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av fólki, 80+ ár | 457 | 669 | 762 | 831 | 899 | 1.126 | 1.430 |

FRAMTÍÐARMYND 1: Við umlættingar- og rehabiliteringsdepli (30 nýggj pláss og endurnýggjan av 7 plássum á umlættingarheiminum)

| | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2015 | | Ár 2018 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | | ár 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Búpláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 219 | 28,7% | 242 | 29,1% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 203 | 26,6% | 212 | 25,5% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | (+) 9 |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 16 | 2,1% | 30 | 3,6% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | (+) 14 |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | |
| | | | | | | | | | | | | | | | **(+) 23** |

FRAMTÍÐARMYND 2: Við umlættingar- og rehabiliteringsdepli og 8 umlættingarpláss á Tjarnargarði í 2019/20

| | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2015 | | Ár 2018 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | | ár 2018 | ár 2019/20 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Búpláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 219 | 28,7% | 242 | 29,1% | 250 | 27,8% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | | |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 203 | 26,6% | 212 | 25,5% | 212 | 23,6% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | (+) 9 | |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 16 | 2,1% | 30 | 3,6% | 38 | 4,2% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | (+) 14 | (+) 8 |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | | |
| | | | | | | | | | | | | | | | **(+) 23** | **(+) 8** |

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 240/17 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri

fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d.

Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

# 241/17 Velbastaðvegur – Kirkjubøvegur, um broyting av gøtunøvnunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 03.11.2014 | 2/14 | 14/04894-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 239/14 | 14/04894-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 23/15 | 14/04894-3 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 24/15 | 14/04894-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 80/15 | 14/04894-3 |
| 6 Gøtunavnanevndin | 17.07.2017 | 2/17 | 14/04894-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 205/17 | 14/04894-3 |
| 8 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 232/17 | 14/04894-3 |
| 9 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 241/17 | 14/04894-3 |

**Málslýsing:**
Heitt er á Gøtunavnanevndina um at viðgera málið. Navnið á vegastrekkinum er broytt frá Velbastaðvegur til Kirkjubøarvegur. Atfinningarnar eru, at navnið er broytt í landsadressuskránni í 2008, uttan at tað er viðgjørt í gøtunavnanevndini og samtykt í avvarðandi nevnd og býráðnum.

Starvsfólk á teknisku deild kemur at greiða frá málinum.

**Gøtunavnanevnd 03. november 2014:** Nevndin samtykti at mæla til, at verandi gøtunøvn verða varðveitt.

**Tilmæli:**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Málið varð umrøtt og útsett.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt, at vegastrekkið frá Marknagilsvegnum til Velbastaðar skal eita Velbastaðarvegur og er framhald av Velbastaðarvegnum frá rundkoyringini við Dr. Dahls gøtu/J. C. Svabos gøtu.

Kirkjubøarvegur byrjar frá norðaru avkoyringini til Velbastaðar.

Vísandi til mál 14/02665 um vinnuøkið Úti í Vika, verður harumframt samtykt, at vegastrekkið frá krossinum, har síðugøturnar eru Stiðjagøta, Slættanesgøta, Akranesgøta, Mykinesgøta og við Sandá, skal eita Úti í Vika.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini tó soleiðis, at málið um navnið á vegastrekkinum frá krossinum, har síðugøturnar eru

Stiðjagøta, Slættanesgøta, Akranesgøta, Mykinesgøta og við Sandá verður beint aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at beina málið aftur í gøtunavnanevndina.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir umbøn frá teknisku deild er málið lagt fyri gøtunavnanevndina aftur við áheitan um at finna eitt navn til vegastrekkið, har síðugøturnar eru Stiðjagøta, Slættanesgøta, Akranesgøta, Mykinesgøta og við Sandá. Hetta var áður partur av Velbastaðvegnum. Uppskot frá teknisku deild er, at nevndi teinur verður broyttur til "við Sandá", soleiðis at gøtan, ið nú eitur "við Sandá", verður longd oman til vegamótið. Viðheft er upprit við kortum.

Umhvørvisstovan hevur boðað frá, at tá eitt navn er samtykt til nevnda strekkið, verða broytingar/rættingar framdar sambært býráðssamtykt 26. februar 2015.

**Gøtunavnanevndin 17. juli 2017:** Nevndin hevur tvey uppskot «Gamli Velbastaðvegur» ella «við Sandá».

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at mentamálanevndin tekur dagar ímillum, hvat navnið skal vera.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at navnið skal verða «Gamli Velbastaðvegur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 242/17 Leigumál til heilsu- og umsorganartænastuna, heilsuhús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 190/17 | 17/03060-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 233/17 | 17/03060-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 242/17 | 17/03060-1 |

**Málslýsing:**

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
**Leigumál heilsuhúsið**
Í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum varð heilsuhúsið skipað sum eitt av stóru nýbrotunum innan eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Síðsta hálvtannað árið hevur heilsuhúsið hildið til í gamla realskúlanum, men realskúlin rúmar bert nakrar av tænastunum og fakligu skipanunum annars, og bygnaðarliga hevur verið avbjóðing, at starvsfólk og fakøki hava verið spjadd í býnum í hølisviðurskiftum, sum eins og realskúlin ikki eru nøktandi.

Tað hevur tí ikki eydnast at fáa skapt tann tvørfakliga vinning í mun til at samskipa og samskapa tær borgararættaðu tænasturnar, sum heilsuhúsið skuldi geva.

Fyrisitingin hevur kannað møguleikar fyri øðrum betri hóskandi og meira langtíðar hølisloysnum til heilsuhúsið. Samráðing hevur verið um at leiga Brekkutún 1 í Hoyvík. Ætlaða leigumálið fevnir um 1.018 m2 í tveimum hæddum. Atkomuviðurskiftini eru góð, p-pláss til fleiri enn 25 bilar og busssamband við dyrnar. Bygningurin er hitaður við jarðhita.

Í Brekkutúni kunnu allar funktiónirnar í heilsuhúsinum vera, harundir tær, sum venda sær til borgararnar:
- Móttøka
- Savningarstað og skrivstovur til heimatænastuna
- Viðgerðastovu og skrivstovur til heimasjúkrarøktina
- Venjingarhøli og skrivstovur til ergoterapi
- Venjingarhøli og skrivstovur til fysioterapi
- Goymsla til hjálpartól
- Skrivstovur visitatiónin
- Skrivstovur heimavitjanartænastan Heilræði
- Skrivstovuhøli til eindarleiðara og deildarleiðarar
- Felags starvsfólkahøli
- Skiftirúm og møguleika fyri brúsu til starvsfólk
- Undirvísingarhøli

Í alt koma eini 20 fólk at hava fast starvspláss í bygninginum umframt heimatænastan, heimasjúkrarøktin, og ergo- og fysioterapeutarnir – tilsamans umleið 80 fólk, sum eisini arbeiða heima hjá borgarum og úti á røktarheimum.

At ergo- og fysioterapitoymið kann hava fleiri venjingarhøli í bygninginum ger, at nakað av tí virksemi, sum í dag fer fram á nøkrum røktarheimum ætlað teim heimabúgvandi, kann flytast í heilsuhúsið. Hetta letur so aftur upp fyri, at venjingin til húsfólkini á hesum røktarheimum og til teirra, sum eru á dagtilboðum á røktarheimunum, kann økjast aftur.
Samráðingin um leigusáttmála hevur tikið støði í ynski um 10 ára tíðarskeið, hetta til tess at geva heilsuhúsinum stabilar karmar og umstøður til at kunna mennast eisini við atliti at skjótt vaksandi tørvinum á røktartænastum eins og heilsufremjandi og fyribyrgjandi tilboðum.

Leigukostnaður verður kr. 939.765 u/mvg og orkuútreiðslur og verður at fylgja prístalinum tó ikki fyrstu tvey árini.

Bygningurin er fyri so vítt klárur at taka í nýtslu, onkrar smærri broytingar skulu gerast í mun til klárgering og onkur útgerð og innbúgv skal keypast í mun til víðkaðu virksemismøguleikarnar, meðan restin verður at flyta frá verandi hølum.

Tvey leigumál eru í loftshæddini frammanundan. Útleigarin hevur givið kommununi tilsøgn um, at heilsu- og umsorganartænastan hevur allan bygningin tøkan um ársskiftið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at samtykkja uppskotið til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið við teirri viðmerking, at víst skal verða á fígging.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Leigugjaldið fyri 2018 kr. 1,0 mió kann fíggjast við at broyta fíggjarætlanina fyri 2018 soleiðis, at konta 2722 Tilboð lækkar kr. 1 mió, og konta 2761 Leiga hækkar kr. 1,0 mió.

Viðmerkjast skal, at konta 2722 pr. ultimo september 2017 hevur eina framskrivaða minninýtslu fyri alt árið uppá kr. 2,4 mió. Ávís tilboð eru ikki sett í verk fyrr í ár, men økt tilboð seinnu hálvu ger, at væntaða minninýtslan verður uml. kr. 2 mió.

Samlaða framskrivaða nýtslan fyri allar konturnar í heilsu- og umsorganartænastuna í 2017 kemur væntandi at halda.

Verður kontan 2722 lækkað við kr. 1 mió í 2018, kann omanfyri nevnda framroknaða minninýtslan kompenserað fyri lækkingina og uttan at skerja ætlaða virksemið í 2018. Fyri 2019 og frameftir má tó nýggj fígging fáast til vega.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at fíggja leigugjaldið í 2018 við, at konta 2722 Tilboð í fíggjarætlanini fyri 2018 verður lækkað kr. 1 mió og konta 2761 Leiga verður hækkað við kr. 1 mió.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 243/17 Rakstur av fimleikahøllini í Hoyvíkar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 255/17 | 17/02826-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 232/17 | 17/02826-2 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 243/17 | 17/02826-2 |

**Málslýsing:**
Skúlastjórin í Hoyvíkar skúla heitir í telduposti dagfestur 28. august á Tórshavnar kommunu, at raksturin av fimleikahøllini verður tikin úr rakstrinum hjá Hoyvíkar skúla og flutt til 5717 Ítróttaanlegg, sum umsitur útleiga av høllini. Hallarleiðarin tekur undir við, at raskturin verður fluttur á 5717 Ítróttaanlegg.

Sum skipanin er nú, hevur Hoyvíkar skúli framíhjárætt at leggja tímarnar í ítrótti í høllini, men tað er Ítróttaanlegg, ið tekur sær av allari umsiting og útleigan av høllini, og tað eru brúkarar hjá Ítróttaanleggum, sum brúka høllina meginpartin av tíðini. Tískil metir skúlin, at tað er eyðsýnt, at Ítróttaanlegg eisini tekur sær av rakstrinum.

Inntøkurnar frá útleigan av høllina fara sum nú er á 4120 Hoyvíkar skúli.

Fimleikahøllin er partur av játtanini hjá Hoyvíkar skúla, og tí er fermetratalið nýtt í útrokningini niðanfyri til raksturin av fimleikahøllini.

| | **FÆ 2018 uppskot** | **pr. m2** | **Høll við umkl. á 323 m2** |
|---|---|---|---|
| lønir til reingerð | 1.138.311 | 310 | 100.211 |
| el | 145.000 | 40 | 12.765 |
| olja | 449.000 | 122 | 39.528 |
| reinførisvørur | 37.000 | 10 | 3.257 |
| viðlikahald | 99.000 | 27 | 8.715 |
| **tilsamans** | **1.868.311** | | **164.477** |

Skúlin søkir um, at høllin verður tikin úr rakstrinum tann 1. oktober 2017. Men mett verður, at skal høllin flytast yvir á Ítróttaanlegg, so kann tað verða gjørt 1. januar 2018, og so verður upphædd á 164.477 flutt úr fíggjarætlanaruppskotinim 4120 Hoyvíkar skúli og flutt á 5717 Ítróttaanlegg, sum so eisini fær inntøkurnar av útleigan av fimleikahøllini í Hoyvíkar skúla frá 1. januar 2018.

Fimleikahølli
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at frá 1. Januar í 2018 verður raksturin av fimleikahøllini í Hoyvíkar skúla tikin úr rakstrinum hjá skúlanum og flutt á Ítróttaanlegg og uppskotið til fíggjarætlan 2018 verður lagað til hesa broyting.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 244/17 Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2017 til 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 244/17 | 17/02043-2 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 2. Í Ll. nr. 68 frá 2. Mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. skal Tórshavnar kommuna tilnevna ein lim til leiklistaráðið. Landsstýriskvinnan í mentamálum setir nevndina, ið hevur 7 limir. Virksemi ráðsins er nærri lýst í § 3 og 4 í lógini.

Kommunan er biðin um at tilnevna eina kvinnu og ein mann soleiðis, at landsstýriskvinnan hevur møguleika fyri at seta eina nevnd í tráð við javnstøðulógina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at tilnevna eina kvinnu og ein mann.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Tilnevnd vórðu Jóan Petur Hentze og Eilen Anthoniussen.

# 245/17 Skoytubreytin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 394/16 | 16/04312-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 292/16 | 16/04312-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 305/16 | 16/04312-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 68/17 | 16/04312-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 187/17 | 16/04312-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 168/17 | 16/04312-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 204/17 | 16/04312-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 227/17 | 16/04312-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 217/17 | 16/04312-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 212/17 | 16/04312-1 |
| 11 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 245/17 | 16/04312-1 |

**Málslýsing:**
Skoytubreytin var fyrstu ferð sett upp í 2011 og hevur síðani verið opin uml. 2 mánaðir á hvørjum ári kring ársskiftið. Ymiskt er, hvussu tað hevur hilnast við rakstrinum, men sum heild góð undirtøka.

Á kontu 5716 Skoytubreyt er ikki tøk fígging til at breytin letur upp hetta tíðarskeiðið.

Útgreining viðv. tørvi á eykajáttan í sambandi við uppseting, rakstur og niðurtøku av skoytubreyt – desember 2016 til og við januar 2017.

Farna tíðarskeið var dagligi raksturin útveittur til privatan veitara. Harumframt eru ymiskar útreiðslur í sambandi við flutning, tilfar vm. Hallarumsitingin (Ítróttaanlegg) hevur ábyrgd av anlegginum. Inntøkurnar frá skoytubreytini fara til kontuna.

Leysliga mett er talan um fylgjandi útreiðslur og inntøkur:

Rakstraravtala, uppseting o.a. kr. 270.000 fyri tíðarskeiðið.

Ravmagnsútreiðslur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.
Atgongumerkjainntøkur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.

Samlaður fíggjartørvur fyri tíðarskeiðið umleið kr. 270.000 um óvissa viðvíkjandi inntøkum og ravmagni umleið kr. 30.000. Í alt kr. 300.000.

Ikki er endaliga avrátt viðvíkjandi staðseting.

Standurin og tøknin á verandi skoytubreyt er um at vera ótíðarhóskandi, men verður mett at hon kann roynast einaferð enn.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta á kontu 5716 Skoytubreyt kr. 300.000 fyri 2016 at fíggja av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Skoytubreytin er í ringum standi (bæði kølianlegg og slangur), og verður ikki mett ráðiligt at halda fram við verandi anleggi. Mett verður, at hon eigur at verða burturbeind nú, tí goymsluplássið á Hjalla kostar Ítróttaranleggum einar 65 tkr. um árið.

Um ynski er framhaldandi at hava eina skoytubreyt, ber til at velja millum eina líknandi tøkni við nýggjum og betri kølianleggi ella eina sonevnda íslíkisbreyt (kunstísbreyt). Ein breyt á 20 m x 30 m (uml. 600 $m^2$) og annað tilhoyr, kostar leysliga mett (ref. prísir) uml. 1.000 tkr. Niðanfyri er leinkja til íslíkisbreyt
https://drive.google.com/file/d/0B44uDuymJfBeeTEtRmdiVWx5Y0E/view

Peningur er ikki settur av til endamálið, og má um so er raðfestast í 2017 ella seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Ítróttaanlegg kann burturbeina gomlu skoytibreytina.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ynski er sett fram at fáa eina skoytubreyt aftur í býin til komandi vetur. Í hesum sambandi eru tveir høvuðsspurningar at greiða.

Tann fyrri er ein møgulig staðseting, ið eisini ger av, hvussu stór breytin kann vera. Farnu tvey árini hevur hon staðið á Vaglinum, og áðrenn tað nøkur ár í garðinum við Finsen (fyrrv. kommunuskúlagarðurin) og á Skálatrøð. Fylgjandi møguleikar eru hugsandi til komandi staðseting.

- Vaglið
- Skálatrøð
- Í Gundadali við Gundadalshøllina (tó har er ein avbjóðing viðv. plássi og atkomu í sambandi við komandi útbygging av Tórsvølli)
- Í Gundadali á parkeringsøkinum við Ovara vøll

Á flestu av hesum støðunum vilja vera ávísar ella størri avbjóðingar. Harumframt er spurningur, hvat umhvørvi breytin skal vera partur av. Farnu árini hevur breytin vanliga verið opin í desember og januar á hvørjum vetri.

Annar spurningurin er kostnaðurin. Fyribils metingar eru, at ein vanlig breyt við ektaðum ísi, umframt ymiska útgerð vil kosta umleið 1.000 tkr. og somuleiðis ein íslíkisbreyt. Fremsti fyrimunurin við íslíkisbreyt er, at hon ikki brúkar streym, men kannað eigur at verða, hvussu ein slík roynist ella upplivist um so er, at ynskið er at útvega eina slíka.

Umframt løgukostna er eisini neyðugt við ávísari nettojáttan til raksturin, tí higartil hava gjøldini ikki dekkað allan raksturin og uppseting, tó so, at helst ber til at hækka gjøldini nakað uttan at tað vil ávirka eftirspurningin hjá brúkarunum stórvegis.

Skal nýggj breyt verða tøk at taka í nýtslu síðst í november, skal berast skjótt at.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at taka støðu til, um nýggj skoytubreyt skal fáast til vega, og um so er, at taka støðu til fíggingina av hesum
b) at umrøða møguliga staðsetingar og beina tann spurningin til byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við at fáa til vega nýggja skoytibreyt, at staðseta hana í miðbýnum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tað eru avmarkaðir møguleikar í miðbýnum í mun til staðseting til skoytubreyt og stødd.

Í sambandi við framtíðar býarplanlegging av býnum, kundi skoytubreytin verið hugsað inn sum ein liður í eini langtíðarloysn, t.d. sum ein partur av torginum í Vágsbotni ella á Skálatrøð, tá Tjóðleikhúsið gerst aktuelt. Staðsetingin á Vaglinum seinnu árini hevur eisini verið væl móttikin av brúkarum.

Niðanfyristandandi uppskot leggja upp til skoytubreytir, ið lættliga kunnu setast upp og takast niður aftur. Staðsetingar kunnu roynast, so funnið verður fram til bestu langtíðarloysnina at staðseta eina skoytubreyt, antin um talan er um eina loysn í miðbýnum ella í sambandi við eina møguliga multihøll.

Í sambandi við spurningin um møguliga staðseting av skoytubreytini, er býarskipanardeildin komin fram til tríggjar møguleikar, umframt at víst verður á nøkur alternativ, sí kortskjal journal nr. 16/04312-7:

**Vágsbotnur**
Torgið í Vágsbotni er ein liður í miðbýarætlanini, og tað er væl hugsandi, at ein skoytubreyt kann gerast ein støðug (vetrar)loysn í sambandi við eina dagføring av verandi skipan á økinum. Økið liggur í hjartanum í miðbýnum og við trappuni sum áskoðarpláss og kaffistovunum út eftir bryggjukantinum er hetta ein eyðsæð staðseting í mun til býarplanleggingina og býarlívið. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$, og kundi staðsetingin verið roynd sum ein fyribils verkætlan í sambandi við dagføringina av verandi skipan á økinum.

**Vaglið**
Her hevur skoytubreytin staðið áður, og hevur tað riggað væl, hóast hendinga mótmæli er komið um at handlar missa viðskiftafólk. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$.

**Við Bókhandilin**
Triðja uppskotið er at staðseta eina skoytubreyt millum Tinghúsvøllin og Bókhandilin. Henda loysnin er ikki roynd áður, men økið liggur eisini í hjartanum í miðbýnum og kann virka fyri, at skoytubreytin gerst sjónlig í býarmyndini og tískil virkar dragandi fyri fólk til gongu. Pláss er fyri eini skoytuberyt áleið 250-350 $m^2$.

Harafturat ber til at vísa á nakrar alternativar staðsetingar:

- **Skálatrøð,** óavmarkað stødd. Uml. 400 $m^2$
- **Frúutrøð,** økið liggur ikki í miðbýnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 500 $m^2$
- **á Glasheyggi,** ikki mitt í býnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 400 $m^2$

Í øllum uppskotunum omanfyri skulu atlit takast til ferðslu og parkering.

Viðmerkjast skal, at øll uppskotini á kortskjalinum eru vegleiðandi og kunnu tillagast økið.

**Skjøl:**
Uppskot um staðseting til skoytubreyt 16/04312-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja staðsetingina í Vágsbotni ella at vísa á eina av útvaldu staðsetingunum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at fáa staðsetingina í Vágsbotni betur lýsta, at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti.**
Gjørdar eru ávísar forkanningar viðv. møguleikum fyri keypi og leigu av eini skoytubreyt við ísi. Ymiskar tekniskar loysnir eru møguligar. Eitt nú við gummislangum ella alurørum í sjálvari ísskoytubreytini, umframt kølikompressara. Aðra útgerð til breytina eigur Ítróttaanlegg longu frá undanfarnu skoytubreyt. Veljast kann eisini at keypa bandar, ið eru gjørdir til endamálið ella brúka ta sjálvgjørdu loysnina, ið Ítróttaanlegg hevur gjørt og brúkt higartil. Ávís sparing er í tí.

Vegna knappa tíð verður mett frægast at leiga eina skoytubreyt (stødd umleið 20 m x 25 m) og kunnu so fyrireikingar verða gjørdar til at fyrireika keyp av eini skoytubreyt til sesongina 2018/19. Til ber bæði til at keypa eina nýggja breyt og brúktar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini og uppseting v.m. verður mett neyðugt við eini játtan á uml. 600 tkr. Roynt verður at fáa til vega tvey tilboð uppá leigu av skoytubreyt.

Keyp er eisini møguligt og krevur tá eina játtan á tils. umleið 2 mio.kr.

Fígging er sum er ikki tøk á konto 5716 Skoytubreytin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2017/18 og í hesum sambandi játta kr. 600.000 til kontu 5716 skoytubreyt.

Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til játta kr. 600.000 av kontu 20910 aðrar inntøkur til kontu 5716 skoytubreyt

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at skoytubreytin heldur verður keypt enn leiga og at finna eina endaliga staðseting til eina framtíðar skoytubreyt í miðbýnum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum i mentamálanevndini og vísir á, at leigan av skoytubreyt ikki er boðin út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini 28. september 2017, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

Ímóti atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

# 246/17 Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 30/15 | 15/00485-33 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2015 | 38/15 | 15/00485-33 |
| 3 Tekniska nevnd | 02.09.2015 | 82/15 | 15/00485-33 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 206/15 | 15/00485-33 |
| 5 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 153/15 | 15/00485-33 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 280/15 | 15/00485-33 |
| 7 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 4/16 | 15/00485-33 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 25/16 | 15/00485-33 |
| 9 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 20/16 | 15/00485-33 |
| 10 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 15/17 | 15/00485-33 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 72/17 | 15/00485-33 |
| 12 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 97/17 | 15/00485-33 |
| 13 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 51/17 | 15/00485-33 |
| 14 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 235/17 | 15/00485-33 |
| 15 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 246/17 | 15/00485-33 |

**Málslýsing**:
Ráðgevi er biðin um at gera eitt projekt um at umskipa Velbastaðvegin frá Akranesngøtu og oman til bygningin hjá SEV við Sandá.

Projektið verður framlagt á fundinum.

Møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 3. desember 2002:** Nevndin samtykti at fara undir at bjóða arbeiðið út beinanvegin í innbodnari lisitatión, og at tilboð verður at leggja fyri nevndina aftur saman við tilmæli.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur saman við ráðgeva fram projekt við kostnaðarmeting og tíðarætlan. Entreprisumarkið er frá vegnum við Sandá (við uttasta part av gamla Velbastaðvegnum) og oman til Slættanesgøtu.

Arbeiðið at umleggja Velbastaðvegin við Krossin umfatar stórt veitingararbeiði, og er tað ein fortreyt, at farast má undir annan partin, ið er frá Slættanesgøtu oman til vegamótið til ringvegin.

Sum partur í at fíggja projektið, er møguleiki fyri at selja partar av ognini. matr. nr. 1090, Tórshavn, sambært uppskoti, ið umsitingin hevur latið gera (j. nr. 200202700/6).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við uppskotinum (j. nr. 200202700/5).

**Tekniska nevnd 25. februar 2003:** Nevndin samtykti at senda málið til hoyringar.

Nevndin samtykti eisini at bíða við útbjóðingini, til fígging er fingin til vega, og at ein heildarætlan fyri økið fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jákup Suni Joensen og Jógvan Arge, samtykti at heita á teknisku nevnd um at raðfesta projektið frammaliga.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Schumann Hjaltalin, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 25. februar 2003.

**Tekniska nevnd 12. august 2003:** Nevndin samtykti, at projektið verður víðkað til at umfata allan Velbastaðvegin frá "fa. Bilfríðkan" til "við Sandá", at leggja fyri nevndina aftur. Vegurin verður gjørdur bert við gongubreyt á ovaru síðu. Atkoma til møguliga útstykking á matr. nr. 1090 kann verða frá verandi vegi, sum fyribilsloysn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt hoyring í málinum við íbúgvar og virkir í umráðnum fram við Velbastaðvegin, sí j. nr. 200202700/9.

Vísandi til broytta byggisamtykt fyri økið sunnan fyri p/f Nomatek, so hevur plandeildin lagt av eitt øki til at selja sum grundøki.

Umsitingin hevur gjørt uppskot um makaskifti millum ognina hjá TK, matr.nr. 1090, og ognina hjá Edith Holm, matr. nr. 1091. Víst verður til notat og plantekning, j. nr. 200202700/6. Hetta fyri at fáa markið millum ognirnar at ganga meira beint niðan í landsvegin. Stykkið er uml. 5279 m².

Sp/f Lodd hevur søkt um keypa økið vestan fyri 1087c, vísandi til umsókn og nevndarsamtykt sí j. nr. 200003058/1 og 9.

Sp/f Annfinn Debess hevur søkt um keypa ella leiga økið, matr. nr. 1087b sunnan- vestan fyri 1087c, vísandi til umsókn og nevndarsamtykt sí j. nr. 200002232/1 og 8.

Umsitingin hevur gjørt eina plantekning nr. 2 og 3, sí j. nr. 200202700/18, sum vísir uppskot til atkomuveg til vinnistykki hjá sp/f Lodd og sp/f Annfinn Debess. Uppskotið tekur støðið í, at ein geiri uppá 3,5 m inni á økinum hjá sp/f Annfinn Debess, og ein geiri uppá 3,5 m og ein radios 5 verður at nýta til atkomuveg. 74 fermetrar frá sp/f Annfinn Debess og 88 fermetrar sp/f Lodd verða nýttir til atkomuvegin.

P/f Landsbyggifelagið er í ferð við at gera detailprojektið liðugt sambært teknisku nevnd 12. august 2003. Miðað verður eftir at fáa projektið liðugt til fyrst í juli mánað. Projektið saman við eini samlaðari kostnaðarmeting verður at leggja fyri teknisku nevnd fyrst í juli mánað.

Ein fyribils kostnaðarmeting áljóðandi kr. 7. mió. er gjørd av ráðgeva fyri sjálvt arbeiðið uttan MVG, vatn- og gøtuljós, projektering og óvæntaðar útreiðslur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. mai 2004:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina:

<u>at</u> gera gerðabýti millum ognirnar matr. nr. 1090 hjá Tórshavnar kommunu og matr. nr. 1091 hjá Edith Holm. Sambært notat j.nr. 200202700/6.

at grundstykkið oman Sandá íalt 1326 m² verður selt sum vinnustykki. Sambært plantekning 2 og 3.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

- Vísandi til nevndarsamtykt í teknisku nevnd 12. august 2003, hevur umsitingin latið gjørt uppskot til ráðgevingaravalu við P/F Landsbyggifelagið, sí j. nr. 200401352/2, í sambandi við at gera eitt fullfíggjað vegaprojekt frá "fa. Bilfríðkan" og út til vegin "við Sandá".

Fíggjarkarmurin fyri samlaðu verkætlanina er, alt íróknað, uml. 9,62 mill., tó u/MVG.
Samlaða gjaldið fyri veitingar LBF´s verður kr. 980.000,-, sum er 11,5 % av 8,5 mill, sí kostnaðarmeting hjá LBF sí j.nr. 200401351/2, treytað av at tíðarætlanin verður fylgd.

Víst verður til uppskot til ráðgevingaravtalu, j. nr. 200401352/2 fyri at síggja uppbýtið fyri samlaðu ráðgevingina. Eisini verður víst til kostnaðarmeting, j. nr. 200401351/2.

Umsitingin biður í hesum sambandi um fígging til projekteringina áljóðandi kr. 770.000,- u/MVG.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játtaðar verða kr. 818.125,-, sum er kr. 770.000,- v/6,25% MVG.

**Tekniska nevnd 8. juni 2004:** Nevndin samtykti at bjóða projekteringina út.

Forkvinnan ynskir at fáa viðgjørt málið um umskipan av Velbastaðvegnum. Víst verður m.a. á, at tað er umráðandi at fáa sett gongd á dagføringina, tí umleið 40 fyritøkur á hesum strekki, sum allar hava stóran tørv fyri at fáa til- og frákoyringarviðurskiftini í rættlag. Víst verður eisini til broytt ferðslumynstur, eftir at brúgvin um Sandá verður tikin í nýtslu.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til arbeiðið. Tað fyriliggur eingin kostnaðarmeting av uppskotinum um vegagerðina.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 100.000,- til projektuppskot við dagførdari kostnaðarmeting, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin kemur við tilmæli um fígging av teimum kr. 100.000 til fundin.

**Fíggjarnevnd 18. februar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd. Arbeiðið verður fíggjað av rakstrinum á tekniska økinum og lagt fyri aftur til politiska støðutakan á fyrstkomandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur heitt á LBF um at gera eina dagførda kostnaðarmeting av vegastrekkinum frá Ringvegnum og út til Nomatek. Kostnaðarmetingin tekur støði í einum 6,5 m vegi við gongu- og súkklubreyt á báðum síðum á 3 m. Eisini er ein vegaøksl á 0,5 m á báðum síðum. Samlaða vegabreiddin er 13,5 m.

Umsitingin hevur eisini heitt á LBF um at gera eitt prosjektuppskot, sí TK j.nr. 15/00485-47.

**Fíggjarlig viðurskifti**
LBF hevur latið gjørt eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 13.689.710,- u/mvg, sí TK j. nr. 15/00485-45. Umsitingin hevur latið gjørt eina samlaða kostnaðarmeting íroknað prosjektering, eftirlit, keyp av lendi v.m. áljóðandi kr. 19.238.927,-, sí TK j. nr. 15/00485-46.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 20 mió. kr. av langtíðaríløgum innan vegir og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Ùtsett.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við tillutan av íløgujáttan fyri 2016 álj. 7 mió. kr. verður mett, at arbeiðið kann verða gjørt frá vegaíbindingini við ringvegin og niðaneftir. Arbeiðið fer at fevna um retablering av vegaøkinum framman fyri Velbastaðvegnum nr. 43-47 (sp/f El.fo, sp/f Gravsteinar og Hjálpirót umframt sp/f Bilrøkt) og niðan ímóti Slættanesgøtu. Vísast skal samstundis á, at tað er trupult at meta ítøkiliga hvssu langt komast kann fyri ásettu játtan.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd til víðari viðgerð.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um dagføring av vegastrekkinum við rundkoyringina til Glyvursvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fara undir at fyrireika útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndin aftur og at játta 2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri 2016 (fyri Velbastaðvegin kto 8175) og at beina málið, um fíggjarnevidna, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tað eru í løtuni ongar ítøkiligar ætlanir um at umskipa Velbastaðvegin. Hetta er heldur ikki raðfest á íløguætlanini hjá kommununi. Arbeiðið við at reetablera vegaøkið framman fyri Velbastaðvegnum nr. 43-47 er gjørt.
Mælt verður tí til, at verkætlanin verður lokað og játtanin nýtt til aðrar átrokandi vegaætlanir.

Eftir av játtanini eru kr. 1.979.088, sum verða fluttar aftur á íløgukarmin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið **í** fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, mæla heldur til at fáa vegin dagførdan sum skjótast.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið við teirri viðmerking, at mælt verður til, at vegurin verður raðfestur á langtíðaríløguætlanini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til støðu sína í teknisku nevnd.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Jákup Dam, um at beina málið í teknisku nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyt:**
Asfalterað er nýtt slitlag á “Gamla Velbastaðvegin” og hevur hetta betrað munandi um atkomuviðurskiftini til ídnaðarøkið har. Við hesi dagføring er bráðfeingis tørvurin at betra um vegatkomuna loystur. Sjálvir vegirnir inn á ídnaðarøkini verða lýstir og møguliga dagførdir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingur mæla til at 912.360,- kr. verða fluttar til verkætlanina mál 17/02864 “Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri”. At 380.000,- kr. verða brúktar til asfaltering av hesum vegnum og at neyðugar ábøtur á vegirnar inn til ídnaðarøkið verða gjørd fyri upp til 686.728,- kr., at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina máliði í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 247/17 Ferðavinnupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 02.05.2016 | 23/16 | 16/01810-1 |
| 2 Vinnunevndin | 03.10.2016 | 37/16 | 16/01810-1 |
| 3 Vinnunevndin | 02.10.2017 | 49/17 | 16/01810-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 236/17 | 16/01810-1 |
| 5 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 247/17 | 16/01810-1 |

**Málslýsing:**
Fyri fýra árum síðani samtykti Løgtingið at uppraðfesta ferðavinnuna munandi við hægri játtan. Hesi fýra árini er ferð av álvara komin á menningina í føroysku ferðavinnuni. Fleiri nýggj gistingarhús og nýggjar matstovur eru komnar. Fleiri nýggir aktørar royna seg á ymsan hátt innan ferðavinnuna, og fleiri nýggj tilboð eru til ferðafólk.

Í 2015 kom talið á gistingum upp um 158.000, og er hetta ein vøkstur upp á 20 prosent sammett við 2013. Umsetningurin í vinnuni er vaksin við sløkum 40 prosentum upp á 3 ár - úr 416 mió. kr. í 2011 upp í 572 mió. kr. í 2014. Og ferðavinnan stendur nú fyri næstan 10 prosentum av føroyska útflutningsvirðinum.

Málið er, at ferðavinnan skal tryggja ein meiri støðugan búskaparvøkstur í Føroyum, tí ferðavinnan skapar nógv fleiri nýggj størv, sammett við aðrar vinnugreinir. Samstundis er ferðavinnan ikki líka so tengd at sveiggjum í konjunkturum, sum aðrar vinnugreinir.

Visit Faroe Islands hevur fyrstu árini savnað seg um at marknaðarføra Føroyar úti í heimi. Tí tilvitanin um Føroyar sum ferðafólkaland er ein fortreyt fyri vøkstri innanlands. Vit eru tó nú komin so mikið áleiðis, at neyðugt er at savna seg um at menna ferðavinnuna innanlands.

Skal menningin í ferðavinnuni halda fram, er neyðugt, at fáa fleiri, betri og meiri fjøltáttað tilboð at bjóða ferðafólki. Somuleiðis er neyðugt í størri mun at samskipa ymsu tilboðini og skapa eitt gott og álítandi infrakervi í vinnuni.  Neyðugt er eisini at taka atliti til náttúruna.

Tórshavnar kommuna er ein týðandi partur í at menna ferðavinnuna innanlands. Nógv ferðafólk koma til kommununa, og hvussu Tórshavnar kommuna velur at skipa ferðavinnuna í høvuðsstaðnum, hevur sostatt stóran týdning fyri Føroyar sum heild.  Tískil er neyðugt, at Tórshavnar kommuna orðar ein ferðavinnupolitikk og átøk, sum skulu fremjast fyri at menna ferðavinnuna innanlands.

Í og við at Cruisevinnan er ein stórur partur av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu, verður markanðarføringin til cruisevinnuna eisini partur av ferðavinnupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Ferðavinnupolitikkurin er partur av kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu.

Endamálið við politikkinum er í høvuðsheitum:
- at staðfesta hvussu Tórshavnar kommuna ynskir at raðfesta ferðavinnuna og tey átøk, sum skulu til fyri at menna/varðveita kommununa innan hetta økið.
- fáa lýst verandi støðu innan økið, hvør er málbólkurin og hvat ferðavinnutænastustøði kommunan skal stremba eftir at náa.

- At skapa eina burðardygga ferðavinnu, sum tekur atlit til fólk og umhvørvi.

Arbeiði fevnir um:
- ✓ Lýsing av verandi støðu innan ferðavinnuøkið
- ✓ Hvør er málbólkurin og hvat ferðavinnutænastustøði skal kommunan stremba eftir at náa?
- ✓ Hvørji ítøkilig átøk skulu til?
- ✓ Hvussu verða ítøkiligu átøkini raðfest?
- ✓ Hvør er fíggjarligi tørvurin fyri raðfestu átøkini?

Arbeiðið verður at leggja fyri nevnd og býráð til góðkenningar.

Arbeiðið verður fíggjað av konto 7310 kr. 200.000 Vinnustrategi og Tórshavnar havn kr. 100.000

Sí eisini hjálagda skjal.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og havnarmeistarin mæla vinnunevndini at taka undir við ætlanini at orða ferðavinnupolitikk og ítøkilig átøk fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnunevndin 02. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 03. oktober 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Grundað á økta ferðavinnu og stóra búskaparliga týdningin ferðavinnan hevur fyri land og kommunu varð avgjørt, at Tórshavnar kommuna skuldi orða ein ferðavinnupolitikk og átøk, sum skulu fremjast fyri at menna ferðavinnuna innanlands. Talið av gistingum fyrsta hálvár 2017 er 75.602 gistingar, sum eru 8.000 fleiri gistingar enn sama tíðarskeið 2015, sum annars var eitt merkisár í sambandi við sólarmyrkingina.
1.september 2017 var politikkurin liðugur við 23 ítøkiligum átøkum, sum fevna um tíðarskeiði 2017-2020.
Tá ið kommunan skal arbeiða við ferðavinnumenning, eru tað ymisk grundleggjandi viðurskifti sum í fyrstu atløgu mugu raðfestast. Í høvuðsheitum snúgva átøkini seg um at tað skal verða lætt at ferðast og finna veg í ferðamálinum; kort og faldarir skulu dagførast, talgilda kunningin skal uppraðfestast og ein ferðavinnuskeltingarætlan gerast. Eitt brand skal gerast fyri Tórshavn sum høvuðsstað og ferðavinnubý við støði í tí sum longu er í kommununi. Visit Tórshavn skal umskipast, har økir sum menning, marknaðarføring og kunning til ferðafólk eru uppraðfest. Náttúran skal verjast, og økini í kommununi hvør í sær mennast eftir møguleikum og ynskjum frá borgarum á staðnum. Ein ætlan skal gerast fyri cruisevinnuna, við áherðslu á at fáa henda málbólk at leggja fleiri pengar eftir seg.

Átøkini taka millum annað støði í samrøðum við ferðavinnuaktørar úr Føroyum og grannalondunum. Ferðafólkakanningum, kanning um Visit Tórshavn, álitinum frá Uttanríkis og Vinnumálaráðnum, ársfrágreiðinum (VFI) og greinum og vísindaligum útgávum annars.

Visjónin við átøkunum er at menna eina kappingarføra ferðavinnu, sum tekur atlit til borgarar og umhvørvið, herundir at:

- Økja um jaliga virðið av ferðavinnuni
- Leingja um sesongina
- Fáa tey “røttu” ferðafólkini
- Fáa ferðafólkini at gista fleiri nætur
- Fáa ferðafólkini at leggja fleiri pengar eftir seg
- Skal koma borgarum og náttúru/umhvørvinum til góðar
- Kunning og upplivingar í hásæti

Mælt verður til, at peningur verður settur av til at fremja hesi tiltøk í verk í tíðarskeiðinum 2017-2020.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis vinnunevndina og fíggjarnevndina at umrøða og taka undir við ferðavinnupolitikkinum og átøkunum

**Vinnunevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

# 248/17 Fíggjarætlan 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 123/17 | 17/01619-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 145/17 | 17/01619-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 29.05.2017 | 27/17 | 17/01619-1 |
| 4 Eldranevndin | 29.05.2017 | 10/17 | 17/01619-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 138/17 | 17/01619-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 156/17 | 17/01619-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 38/17 | 17/01619-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 02.10.2017 | 40/17 | 17/01619-1 |
| 9 Eldranevndin | 02.10.2017 | 18/17 | 17/01619-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 244/17 | 17/01619-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.09.2017 | 37/17 | 17/01619-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 211/17 | 17/01619-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.09.2017 | 216/17 | 17/01619-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 227/17 | 17/01619-1 |
| 15 Vinnunevndin | 02.10.2017 | 54/17 | 17/01619-1 |
| 16 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 55/17 | 17/01619-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2017 | 192/17 | 17/01619-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 49/17 | 17/01619-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 248/17 | 17/01619-1 |
| 20 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 248/17 | 17/01619-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 263/17 | 17/01619-1 |
| 22 Tilbúgvingarnevndin | 20.10.2017 | 10/17 | 17/01619-1 |
| 23 Eldranevndin | 16.10.2017 | 22/17 | 17/01619-1 |
| 24 Trivnaðarnevndin | 16.10.2017 | 43/17 | 17/01619-1 |
| 25 Trivnaðarnevndin | | | 17/01619-1 |
| 26 Eldranevndin | | | 17/01619-1 |
| 27 Tekniska nevnd | | | 17/01619-1 |
| 28 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 17/01619-1 |

**Málslýsing:** Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2018 verður lagt fram.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Trivnaðarnevndin 29. mai 2017:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á sosialu deild løgdu fram um fíggjarætlanina.

**Eldranevndin 29. mai 2017:** Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorgarnarstjórin løgdu fram.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin løgdu fram.

**Ískoyti:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Stjórnin leggur uppskot til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði fyri fíggjarnevndina at viðgera og góðkenna. Tá uppskotið er viðgjørt og góðkent av fíggjarnevndini verða stjórarnir bidnir um, saman við umsitingini, at gera fíggjarætlanaruppskot fyri 2018.

Stórur búskaparvøkstur er í landinum, seinasta metingin er ein vøkstur á 7-8%. Tórshavnar kommuna er ein munandi partur av hesum. Í teknisku framskrivingini 2018 verður kommunuskatturin mettur til 742 mió. kr. við einum skattaprosentið uppá 19. Kommunuskatturin jan. – apríl er framroknaður liniert umframt ein vøkstur á 3%. Eisini er hædd partvís tikið fyri regulering av kommunuskattinum fyri árið framanundan. Sjálvt um tað gongur væl í løtuni, eigur kommunan at hava ein skynsaman fíggjarpolitikk og varliga inntøkumeting.

Fíggjarleiðarin mælir til, at kommunan vísir fíggjarligt skynsemi við lágum rakstrar vøkstri í so góðum tíðum. Mælt verður til, at fíggjarætlanin skal haldast innanfyri somu karmar sum í 2017. Í hesum uppskoti eru lønarhækkingar ikki tiknar við, lønarhækkingar verða setta inn undir einum seinni í fíggjarætlanartilgongdini. Talan kann vera um hækking í rakstri um talan er um lógarkrøv, býráðssamtykir, sáttmálar o.a. Yvirskipað er málið ein vøkstur í rakstrarútreiðslum uppá í mesta lagi 1,5% fyri alla kommununa.

Í sambandi við rakstrarútreiðslurnar eigur kommunan, at hava støðugt fokus á um skattakrónurnar verða nýttar so skynsamt sum møguligt. Sum ein liður í hesum skulu útveiting og útboð av vørum og tænastum, har kommunan og borgarin kunnu fáa fyrimun, eftirkannast. Eisini verður mælt til at brúkaragjøld í kommununi vera endurskoðaði.

Tórshavnar kommuna hevur samtykt at fara undir fleiri stórar løgur samstundis. Afturat hesum koma fleiri neyðugar, men kostnaðarmiklar løgur. Tórshavnar kommuna hevur út frá verandi fortreytum ein skattafíggjaðan løgukarm á umleið 140 mió. kr. Út frá verandi fortreytum, viðførir hetta ein gjaldføristørv, útyvir skattafíggjaða løgukarmin. Gjaldføristørvurin, kann fíggjast við annaðhvørt tøkum peningi, íløguinntøkum, lánifígging og ella eina kombinatión av nevndu. Býráðið ásetur skatta prosent og barnafrádrátt og kann broyta fortreytirnar. Heldur jaliga gongdin fram kann væntast, at inntøkurnar verða hægri enn væntað fyri 2017, og er møguleiki, at hægru inntøkurnar kunnu gerast partur av fíggingini.

Umráðandi er at hava í huga, at jaliga gongdin, sum longu hevur verið í eitt áramál, skal takast við fyrivarni, tí góðar tíðir halda ikki fram í allar tíðir. Veruleikin við búskaparstøðuni í løtuni er, at Føroyar í nøkur áramál hava ligið í einum hákonjunktur, sum førir við sær, at nógv ferð er á búskapinum. Havast skal í huga, at rentan í fleiri ár, hevur verið óvanliga lág, alivinnan og uppisjóvarvinnan hava verið sera lønandi, oljuprísurin lágur o.s.fr. broytast hesi viðurskifti fær hetta avleiðingar á búskapin. Tí skal vera mælt til, at Býráðið ikki setur fleiri stórar kostnaðarmiklar løgur í gongd komandi ár. Hettar eisini við atliti til, at samlað leggja stóru íløgurnar stórt trýst á búskapin, kommunan fær munandi minni fyri skattakrónurnar, um alt fer av bakkastokki í senn.

Fíggjarætlanin verður løgd fyri fíggjarnevndina 20. september 2017 og fyri býráðið 28. September. Býráðið hevur 1. viðgerð 26. oktober og 2. viðgerð 23. november.

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til, at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði 2018. Stjórarnir skulu saman við umsitingini, gera fíggjarætlan og nýggjar metingar fyri 2018, sambært uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Uppskot á greinastøði framlagt og beint í avvarðandi nevndir.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Lagt fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Lagt fram.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært tíðarætlanini skal fíggjarnevndin viðgera uppskot til fíggjarætlan 2018 at leggja fyri býráðið. Tilfar kemur á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við uppskotinum til fíggjarætlan 2018 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum eru, at skattaprosenti verður verandi á sama støði, barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. og hædd er tikið fyri virksemisbroytingum og raðfestingum. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

## Uppskot á greinastøði 2018

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2016 | Ætlan 2017 | Ætlan 2018 | Broyting 2017/2018 pct. | Broyting 2017/2018 kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 742.270 | 695.822 | 756.842 | 8,8% | *61.020* |
| 20601 | Felagsskattur | 32.449 | 22.000 | 30.000 | 36,4% | *8.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.752 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 109.024 | 110.967 | 123.151 | 11,0% | *12.184* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.507 | 37.224 | 36.004 | -3,3% | *-1.220* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 4.866 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Inntøkur íalt** | **925.868** | **868.013** | **947.997** | **9,2%** | ***79.984*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 78.273 | 79.548 | 81.501 | 2,5% | *1.953* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 209.018 | 221.589 | 229.000 | 3,3% | *7.411* |
| §3 | Børn og ung | 153.123 | 161.340 | 168.150 | 4,2% | *6.810* |
| §4 | Undirvísing | 41.732 | 41.310 | 40.988 | -0,8% | *-322* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §5 | Mentan og frítíð | 44.496 | 48.544 | 52.164 | 7,5% | *3.620* |
| §6 | Teknisk mál | 125.490 | 123.732 | 130.228 | 5,3% | *6.496* |
| §7 | Kommunal virkir | 12.724 | 28.861 | 32.985 | 14,3% | *4.124* |
| | **Rakstur íalt** | **664.856** | **704.924** | **735.016** | **4,3%** | ***30.092*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.059 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 69 | 2.000 | 2.656 | 32,8% | *656* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **18.128** | **22.000** | **22.656** | **3,0%** | ***656*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **242.883** | **141.089** | **190.325** | **34,9%** | ***49.236*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur | 4.479 | 6.150 | 5.500 | -10,6% | *-650* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 1 | 100 | 100 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **4.478** | **6.050** | **5.400** | **-10,7%** | ***-650*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri** | **238.405** | **135.039** | **184.925** | **36,9%** | **49.886** |
| | | | | | | |
| | Avdráttir | 16.711 | 17.939 | 19.800 | | |
| | Úrslit av rakstri | 221.694 | 117.100 | 165.125 | 41,0% | 48.025 |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur** | **221.694** | **85.475** | **133.500** | **56,2%** | **48.025** |
| | | | | | | |

Stórur búskaparvøkstur hevur verið seinastu árini. Samlaðu inntøkurnar eru mettar at vera 948 mió. kr. í mun til 868 mió. kr. í 2017. Hettar svarar til ein vøkstur á 9,2%

Í uppskotinum er kommunuskatturin framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í árinum. Harumframt er roknað við einum vøkstri upp á 3%. Eisini er partvís tikin hædd fyri reguleringini í kommunuskattinum fyri 2017. Inntøkur frá kommunuskattinum hækka sostatt 8,8% ella 61 mió. kr. í mun til fíggjarætlanina fyri 2017.

Inntøkur í sambandi við skatti av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru ásettar sambært upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum.

Tórshavnar kommuna er ein kommuna í vøkstri og merkir hettar økt virksemi og tænastur. Samlaðu útreiðslurnar økjast úr 705 mió. kr. til 735 mió. kr. tvs. við 4,3% ella við 30 mió. kr. í mun til upprunaligu fíggjarætlanina fyri 2017.

*§1 kommunual fyrisiting* økist við 2,5% ella 1,9 mió. kr. Økingin stendst í høvuðsheitum av, at peningur er settur av til eldranevndina, fólkaatkvøða verður í 2018, talgilding og fleiri tænastumannaeftirlønir.

*§2 Almanna- og heilsumál* økist við 3,3% ella 7,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin er eldraøkið, har ætlanin m.a. er at útvega fleiri umlættingarpláss. Hædd er eisini tikin fyri at integratíónssamskipari verður settur at veita tænastur til tilflytarar og til integratiónsátøk.

Játtanin til *§3 børn og ung* fylgir í høvuðsheitum barnatalinum sum væntandi verður hægri í 2018. Aðrar raðfestingar á økinum eru m.a. tímar vegna serligan tørv og tilboð til ung. Sambært uppskotinum økjast útreiðslurnar til børn og ung 4,2% ella við 6,8 mió. kr.

Játtanin til *§4 Undirvísing* lækkar í mun til árið frammanundan, við -0,8% ella 322 t.kr. Játtanin fylgir mettað næmingatalinum.

Virksemið á *§5 Mentan og frítíð* er økt. Útreiðslurnar økjast við 7,5% ella 3,6 mió. kr. Hædd er tikið fyri fleiri tiltøkum á mentanarøkinum. Umframt at ætlanin er at økja stuðulin m.a. til Westward Ho. Raksturin á ítróttarøkinum er øktur orsaka av meira virksemi. Kommunan hevur fingið fleri hallir og vallir at umsita.

*§6 Teknisk mál* økist við 5,3% ella 6,5 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin er uppraðfesting av viðlíkahaldi av bygningum hjá kommununi. Tórshavnar kommuna stendur í vøkstri og verða fleiri nýggj økir at umsita. Í uppskotinum er hettar raðfest við at seta meira av til fríðkan og viðlíkahald.

*§7 Kommunal virkir* økist við 14,3% ella 4 mió. kr. Størsti parturin av øktu játtanini er ætlað til at styrkja og menna ferðavinnuna í Tórshavnar kommunu.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 190 mió. kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir 185 mió. kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 133,5 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 22. september 2017:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Framlagt

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2017:** Nevndin ynskir at raðfesta fyribyrging innan barnavernd, sí mál 17/02922 um uppnormering av barnaverndartænastuni, og sálarliga heilsu.

**Vinnunevndin 02. oktober 2017:**
Meirilutin: Bogi Andreasen, Jákup Dam tekur undir við ætlanini á vinnuøkinum.
Minnilutin: Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Umrøtt og verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini á tekniska økinum og at hækka játtanina til reinhaldið.

Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2017:** Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini á tekniska økinum og at hækka játtanina av viðlíkahald av bygningum konto 6110, og fríðkan og viðlíkahald av konto 6210. Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein vóru ikki við til hetta málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við ætlanini á náttúru- og umhvørvisøkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Eldranevndin 16. oktober 2017:**
Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarætlanini á eldraøkinum og mælir til hesar broytingar:
- At hækka játtanina til heimahjálp við kr. 1.330.000 svarandi til eina nýggja rutu (105 starvsfólkatímar um vikuna).
  At hækka játtanina til gjøld fyri røktarbúpláss í øðrum kommunum við kr. 5.000.000 svarandi til 8 pláss í eitt ár.

**Trivnaðarnevndin 16. oktober 2017:**
Meirilutin, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við fíggjarætlanini á trivnaðarøkinum og mælir til hesar broytingar:
- At hækka kontu 2614 Barnaverndartænastan við kr. 350.000 til uppnormerning
- At lækka kontu 2617 brúkaragjøld, serstovnar, við kr. 350.000

Harumframt ger nevndin vart við, at eftir ætlan verða tveir nýggir kommunulæknar settir í næstum, sum hædd er ikki tikin fyri í fíggjarætlanaruppskotinum. Av tí at tað ikki er greitt enn, nær læknarnir verða settir, og hvat etablering og rakstur av nýggjum viðtalum væntast kostað, mælir nevndin til, at hetta verður tikið upp aftur seinni møguliga sum eykajáttan.

Minnilutin, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, taka støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Gunvør Balle og Jákup Dam samtyktu at taka undir við fíggjarætlanini á mentanarøkinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen taka støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Við atliti til, at vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal vera á einum hóskandi støði, hevur umsitingin gjøgnumgingið fíggjarætlanaruppskotið og mælir til niðanfyristandandi broytingar:

Broytingaruppskot frá umsitingini:

| Konta | Kontuheiti | Lækking |
|---|---|---|
| 1210 | Val og valnevndir | 238 |
| 1315 | Nevndir og ráð | 250 |
| 2211 | Heilsufrøðiskipanin | 25 |
| 2611 | Barnaverndarstovan | 115 |
| 2615 | Pedagogisk fríplass | 75 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | 1.250 |
| 2810 | Fíggjarlig fríplass | 150 |

| | | |
|---|---|---|
| 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 50 |
| 5210 | Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms og Listaskúli | 500 |
| 5310 | Mentanartiltøk o.a. | 500 |
| 6110 | Húsaumsitingin | 500 |
| 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | 250 |
| 7316 | Hugskotið | 100 |
| 7510 | Bussleiðin | 1.547 |
| 8112 | Asfalt | 100 |
| 8210 | Gøtuljós | 150 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 200 |
| **Í alt** | | **6.000** |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevdini til at taka støðu til fyriliggjandi rakstrarætlan og niðanfyristandandi løguætlan. Eisini verður mælt til, at støða verður tikin til broytingaruppskot frá nevndunum og uppskot til broyting í rakstrarætlan frá umsitingini.

**Høvuðsyvirlit**

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | **2018** |
|---|---|---|---|
| | Rakstrarætlan | | Løguætlan |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **81.501** | **-** | **-** |
| 11. Felagsútreiðslur | 77.696 | - | - |
| 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.805 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **229.000** | **-** | **35.000** |
| 20. Heilsumál | 18.379 | - | - |
| 21. Almannamál | 210.621 | - | 35.000 |
| **§ 3. Børn og ung** | **168.148** | **-** | **-** |
| 24. Mentan | 9.634 | - | - |
| 26. Barnaansing | 158.514 | - | - |
| **§ 4. Undirvísing** | **40.988** | **-** | **100.000** |
| 23. Útbúgving og gransking | 40.988 | - | 100.000 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **52.164** | **-** | **45.500** |
| 23. Útbúgving og gransking | 11.460 | - | 44.000 |
| 24. Mentan | 40.704 | - | 1.500 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **130.229** | **-** | **18.500** |
| 11. Felagsútreiðslur | 62.248 | - | 3.500 |
| 24. Mentan | 3.222 | - | 4.000 |
| 30. Umhvørvi | 23.061 | - | 11.000 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 41.698 | - | - |
| **§ 7. Kommunal virki** | **32.986** | **-** | **10.000** |
| 30. Umhvørvi | 18.675 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 9.233 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 11.260 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -6.182 | - | 10.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tilsamans** | **735.016** | **-** | **209.000** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 20.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 5.500 | 100 | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.656 | 947.997 | - |
| Tilsamans | 763.172 | 948.097 | 209.000 |
| **Yvirskot** | **-** | **184.925** | **-** |
| **Rakstrar- løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-24.075** | **-** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 19.800 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **19.800** | **-24.075** | **-43.875** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 43.875 | - |
| Fígging íalt: | - | 43.875 | 43.875 |
| **Samanlagt** | **19.800** | **19.800** | **-** |

# Íløguætlan

| | | 2014<br>J | 2015<br>J | 2016<br>J | 2017<br>J | **2018**<br>**F** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **1.000** | **0** | **1.000** | **1.500** | **35.000** |
| 2775 | Eldrarøkt | 1.000 | | | | |
| 2775 | Íbúðardepil til eldri | | | 1.000 | 1.500 | |
| 2775 | Tjarnargarður | | | | | 10.000 |
| 2775 | Umlættingardepil | | | | | 25.000 |
| **§3** | **Børn og ung** | **5.000** | **5.000** | **8.750** | **0** | **0** |
| 3175 | Birkilund | | 5.000 | | | |
| 3175 | Dagstovnur í Kollafirði | 5.000 | | 8.750 | | |
| **§4** | **Undirvísing** | **0** | **10.000** | **23.000** | **42.075** | **100.000** |
| 4175 | Hoyvíkar skúli | | | 2.000 | | |
| 4175 | Eysturskúlin lon E | | | | | |
| 4176 | Skúlin á Fløtum | | 10.000 | 21.000 | 42.075 | 100.000 |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **43.000** | **47.500** | **36.000** | **26.300** | **45.500** |
| 5175 | Musikkskúli | 3.000 | 20.000 | 10.000 | | 44.000 |
| 5375 | Reinsaríið | 2.000 | | | | |
| 5475 | Býarbókasavnið | | | 3.000 | | |
| 5775 | Høllin á Hálsi | 4.000 | | 20.000 | 17.500 | |
| 5775 | Høllin í Hoyvík | 2.000 | | | | |
| 5775 | Ítróttarhøll inni í Vika á Argjum | 1.000 | | | | |
| 5775 | Ítróttarhøll við Landavegin | 9.000 | | | | |
| 5775 | Tórsvøllur | 12.000 | 20.500 | | 5.000 | |
| 5775 | Svimjihøll | | | | | |
| 5775 | Baðiland | 1.000 | | | | |
| 5775 | Oyggjaleikir/Golfvøllur | 3.000 | | | 3.800 | |
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | 6.000 | | 3.000 | | |
| 5775 | Høl í Gundadali | | 7.000 | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5775 | Ymisk ítróttaranlegg | | | | | 1.500 |
| **§6** | **Teknisk mál** | **42.000** | **101.000** | **54.800** | **15.600** | **18.500** |
| 6175 | Keyp av bygningum | 10.000 | 30.000 | | | |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 2.000 | 5.000 | | 1.000 | |
| 6275 | Frílendisætlan | 1.000 | | | | 500 |
| 6275 | Lendisgøtur | 1.000 | | 1.000 | | 1.000 |
| 6275 | Miðbýarætlan | 9.000 | | 4.000 | | 1.500 |
| 6275 | Spælipláss í miðbýnum | 2.000 | | | | |
| 6275 | Steinatún | | | 4.000 | | |
| 6275 | Vetrarfriðing | | | | | 500 |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / í Kollafirði | 1.000 | | | | |
| 6475 | Byggibúning bústaðir / Djúpagil | 1.000 | | | | |
| 6575 | Kirkjugarðar | 1.000 | | 4.000 | 2.000 | 4.000 |
| 6675 | ESKO – Orku og umhvørvistiltøk | | | | | 1.000 |
| 6875 | Kloakkir | 4.000 | 3.000 | 6.000 | 5.000 | 10.000 |
| 6875 | Kloakk í Marknagili | | | 10.800 | | |
| 8175 | Aðrar vegaverkætlanir | 1.000 | 5.000 | 4.000 | 3.600 | |
| 8175 | Glyvursvegur við brúgv | | 55.000 | | | |
| 8175 | Gongugøtan | 1.000 | | | | |
| 8175 | Súkklubreyt | 1.000 | | | | |
| 8175 | Dvørgastígur | 2.000 | | | | |
| 8175 | Velbastaðvegur | | | 2.000 | | |
| 8175 | Innkomuvegur | | | 5.000 | 4.000 | |
| 8175 | Miðdepil Marknagil | | | 4.500 | | |
| 8175 | Sundsvegur dagføring | | | 2.000 | | |
| 8175 | Klingran | | | 2.500 | | |
| | | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | **2018** |
| | | J | J | J | J | **F** |
| 8275 | Gøtuljós- Orkusparing og stýringar | 1.000 | | 2.000 | | |
| 8375 | Rakstrargøgn | 4.000 | 3.000 | 3.000 | | |
| **§7** | **Kommunal virki** | **19.000** | **0** | **7.000** | **0** | **0** |
| 7175 | Renovatión | 19.000 | | 5.000 | | |
| 7476 | Smábátahavn | | | 2.000 | | |
| | | **110.000** | **163.500** | **130.550** | **85.475** | **199.000** |
| 7475 | Tórshavnar havn | 21.598 | 60.000 | 200.000 | 160.000 | 10.000 |
| | **Samanlagt** | **131.598** | **223.500** | **330.550** | **245.475** | **209.000** |

Játtanin til ymisk ítróttaranlegg á 1,5 mió. kr. er ætlað soleiðis: 200 tkr. til fimleikahøll í Kaldbak, 300 tkr. til golfvøll, 1 mió.kr. til smærri ítróttaranlegg, harundir city volley, street basket, skateboard og skjótibreyt.

**Broytingaruppskot til 1. viðgerð í býráðnum 26.10.17.**

Frá nevndum:

| Deild | Tekstur | Upphædd | Nevnd |
|---|---|---|---|
| **§2-26xx** | Fyribyrging innan barnavernd | | Trivnaðarnevndin 02.10.17 |
| **§6-8111** | Hækkan av játtanini til Reinhaldið | 500.000 | Tekniska nevnd 03.10.17 |
| **§6-6110** | Hækka játtanina av viðlíkahaldi av bygningum | | Byggi- og býarskipanarnevndin 04.10.17 |
| **§6-6210** | Hækka játtanina til fríðkan og viðlíkahald | | Byggi- og býarskipanarnedndin 04.10.17 |
| **§2-2721** | Nýggj ruta til heimahjálp | 1.330.000 | Eldranevndin 16.10.17 |
| **§2-2721** | Røktarbúpláss í øðrum kommunum, 8 pláss í eitt ár | 5.000.000 | Eldranevndin 16.10.17 |
| **§2-2614** | Barnaverndartænastan | 350.000 | Trivnaðarnevndin 16.10.17 |
| **§2-2617** | Brúkaragjøld | -350.000 | Trivnaðarnevndin 16.10.17 |
| | **Íalt** | **6.830.000** | |

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Ein meirluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan 2018 og broytingaruppskoti frá umsitingini. Við tí viðmerking at Finsens verður egið rakstrarstað við eini játtan á 200.000 kr.

Viðvíkjandi teimum broytingum, ið nevndirnar hava mælt til, verða hesar beindar aftur í nevndirnar við atliti til at finna fígging innanfyri samlaða karmin í uppskotinum til fíggjarætlan.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Heðin Mortensen luttók ikk í viðgerðini av málinum.

**Tilbúgvingarnevndin 20. oktober 2017:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt: Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

## 249/17 Kommunuskúlagarðurin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 185/17 | 17/02741-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 220/17 | 17/02741-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 219/17 | 17/02741-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 249/17 | 17/02741-1 |

**Málslýsing:**
Sambært verkætlan nr. 15/02637 Kommunuskúlin: Retrofitting til býarhús, umfatar verkætlanin ikki garðprosjektið, sum skuldi koma seinni. Hetta framgongur av samtykt í fíggjarnevndini 19.04.2016, mál nr. 15/01465.

Í avtaluni millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir framgongur, at:
*Útyvir verkætlanina, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggjum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.*

Drening og kloakk er avgreitt.

Nú er so farið undir at arbeiða upp á garðin, og hevur býarskipanardeildin saman við tekniska stjóranum, í samráði við Bústaðir og arbeiðstakara á staðnum, mett tað verða røttu loysnina at reinsa eldri yvirskotstilfar í hægra partinum av garðinum niður á hellu, so hendan gerst fyri ein part sjónlig við endaligu loysnini. Garðurin kemur bæði í mun til nýggju nýtsluna av skúlanum og býnum sum heild at hava stóran týdning sum miðdepil og uppihald fyri borgarar í øllum aldursbólkum, og tískil varð mett, at garðurin somuleiðis skuldi bjóða býnum eina øðrvísi uppliving.

Við at grava verandi ífyllu burtur og gera hellulandslagið sjónligt, verður hetta ein garður sum brýtur frá tí annars siðbundna býnum við asfalti ella aðrari álegging; hetta verður ein garður, sum bjóðar náttúruni vælkomna inn í miðbýin.

Hendan tilgongdin til garðin hevur so havt við sær, at rættiliga stórur hæddarmunur er á garðinum og eitt nú inngongdunum í bygninginum, og tískil er neyðugt at tryggja atgongd til høvuðsdyrnar í norðaru- og eystaru lonini, umframt at atgongd mátti skipast til nýggjan tunnil frá garðinum og út á Tórsgøtu/Niels Finsens gøtu. Atkoman verður gjørd við betong gøtum í og omaná lendinum. Har hæddarmunurin millum gøtuna og hellulandslagið verður ov høgt, er ætlanin at seta rimaverk upp. Ætlanin er at gera rimaverk í eldri stíli, smíða í essu, sum vit kenna tað aðrastaðni í býnum, t.d. við kirkjugarðinum á Svínaryggi, á Trappuni í Vágsbotni og framvið Havnará niðan móti SSB.

Ætlanin er somuleiðis at fyrireikað nøkur grøn øki og onnur flísaløgd uppihaldsøki í garðinum við beinkjum og øðrum innbúgvi, umframt at tryggja parkeringsøki til bilar, øki til rørslutarnað og øki til neyðsendarakfør. Sum heild at innrætta garðin til nýggja tørvin á staðnum, men eisini sum eitt uppihaldsøki fyri almenningin og eitt øki at ferðast ígjøgnum.

Fyri at kostnaðarstøði av verkætlanini ikki gerst ov høgt, so verður alt planlagt stig fyri stig á staðnum saman við arbeiðstakara og ráðgeva.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitektur mæla til at at taka undir við ætlanini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 1.550.000,00 av kt. 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið i býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 250/17 Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 43/17 | 17/02864-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 50/17 | 17/02864-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 237/17 | 17/02864-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 250/17 | 17/02864-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur kannað møguleikar at betra um atkomuviðurskiftini millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Umsitingin hevur biðið verandi arbeiðstakara á staðnum, Articon, um tilboð at gera veg millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Umsitingin hevur verið í samráð við Articon til tess at finna sparingar á tilboðið. Tá ið sparingar eru framdar, er tilboðið frá Articon áljóðandi 880.000 kr.

Verkætlanin Skúlin á Fløtum skal burturbeina 1000 $m^3$ av mold í Húsahaga. Móttøkugaldið og burturkoyringin kostar 120.000 kr. Ístaðin fyri at beina moldina burtur í Húsahaga, er møguleiki at spara móttøkugjald og frástøðu í burturkoyring, um moldin verður flutt rundanum vegin millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Møguleiki er, at verkætlanin Skúlin á Fløtum flytur 80.000 kr. til verkætlanina vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
880.000 kr. til samans.

Sum liður í eini framtíðar ætlan boðar Fjarhitafelagið frá, at tey hava ynski um at leggja fjarhitarør í vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og ítróttarhøllina á Argjahamri til tess at koma yvirum Tvættá á bíligasta hátt. Fjarhitafelagið stendur sjálvt fyri at gera og gjalda hetta arbeiðið, um tikið verður av tilboðnum hjá Articon, og arbeiðið sett í gongd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum hjá Articon á 880.000 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 880.000,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur aftur verið í samráð við Articon til tess at fáa gøtuljós við í tilboðið, sí tilboð og málslýsing. Endaliga tilboðið frá Articon er áljóðandi 992.360 kr. Articon vátta, at tilboðið er fastur prísur og at teir standa við, at nøgdirnar í tilboðnum eru í lagi.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
992.360 kr. til samans.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av tilboðnum hjá Articon á 992.360 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 992.360,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

## 251/17 Grótið frá Sandoyartunlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 181/17 | 17/02930-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 17/02930-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 224/17 | 17/02930-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 251/17 | 17/02930-1 |

**Málslýsing:**
Tunnilin:
Sandoyartunnilin verður 10,9 km langur og 9,5 m breiður, lægsta punkt er 155 metrar undir havbotninum og mesta hallið verður 5 prosent. Sandoyartunnilin kemur upp í Traðardali millum Skopun og Sand, og streymoyarmegin kemur hann upp á Gomlurætt.

Jarðfrøðiligar undankanningar eru gjørdar, projekteringin er byrjað og eftir tíðarætlanini byrjar arbeiðið í 2018. Byggitíðin er sett til 5 ár, soleiðis at tunnilin verður liðugur í 2023.
Mett ferðsla pr. samdøgur er 310 bilar

Roknað verður við at nøgdin av gróti sum kemur úr tunnlinum verður áleið ein mió m3, harav uml helvtin, ella uml. 500.000 m3, kemur upp á land við Gomlurætt.

**Avgerast skal hvat alt grótið skal brúkast til.**

Búnaðarstovan:
Búnaðarstovan hevur spurt kommununa um tað krevur loyvi frá kommununi at taka ímóti gróti frá tunnlinum, at leggja út á lendi á Velbastað, hetta er okkara j.nr. 17/00760.

Kommunan hevur svarað, at sambært almennu byggisamtyktini kap. 4 §26, um ásetingar fyri 4. grundumráði, so eru broytingar í 4.gr. t.d...velting og moldbreiðsla...o.l., har landsløg verða broytt, umfatað av almennu byggisamtyktini og krevja tí loyvi frá kommununi.

Í eini viðgerð skal kommunan taka atlit til um aðrar ætlanir eru í umráðnum viðvíkjandi bygging, vegagerð, um økið er ætlað til byggilendi nú ella seinni, hvat náttúruvirði er í økinum og ymiskt annað. Tí eiga nágreiniligar árinskanningar/umhvørviskanningar at verða gjørdar av økinum, áðrenn nøkur støða verður tikin.

Um so er at grót skal verða lagt út, er tað eisini av stórum týdningi, at arbeiðið verður viðvíkjandi landslagi væl tilpassað verandi lendi og ikki sær út sum nakað ónatúrligt í økinum.

Tá talan er um 4. grundumráði, so skulu friðingarmyndugleikarnir eisini hava málið til viðgerðar.

Møguleikar:
Talan er um sera stórar nøgdir av gróti og tí er tað umráðandi at grótið verður brúkt til nakað skilagott og at hetta verður væl planlagt og projekt gjørt. Hildið verður, at gróti er væl egnað til fyllu og planering í sambandi við verkætlanir, har nógv grót skal brúkast.

Tá talan er um so nógv grót, so er best at finna eina loysn sum ikki krevur at grótið skal flytast alt ov langt, tá tað ikki vil verða umhvørvisliga burðadygt. Heldur ikki eigur gróti at verða flutt fleiri ferðir, tá tað ikki er fíggjarliga burðadygt.

Ein loysn kundi verið at lagt inn eitt heilt nýtt bústaðarøki á Velbastað, sum kann innihalda sethús, raðhús, íbúðarbygging, miðstaðarøki, ítróttarøki o.a.. Økið vestanfyri Kirkjubøarvegin, sum liggur millum kotu 110 og 140, er væl egnað til bústaðarøki. Hetta vendir vestureftir, hevur gott útsýni, tað er skjótt til Havnar og øki liggur tætt til tunnilsmunnan. Øki liggur í 4.grundumráði og verður tí neyðugt at broyta byggisamtyktina.

Harafturat kann partur av grótinum helst nýtast til at tryggja bakkaverjuna í Kirkjubø og á Velbastað.

Tann 31. august 2017 hevði EST fund við Tórshavnar kommunu har teir upplýstu, at teir fara at koma við eini umsókn til kommununa um grótið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at kommunan tekur upp samráðingar við tunnilsfelagið um at fáa grótið úr tunlinum.
Eisini verður mælt til at umsitingin kannar, um grótið kann brúkast til bakkaverju og til eina útstykking og at býarskipanardeildin ger uppskot til nýtt bústaðarøki, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 18. september 2017:** Borgarstjórin heitir á nevndina um at koma við góðum hugskotum. Samstundis tekur nevndin undir við at partar av grótinum kann brúkast sum verja framman fyri kirkjuna.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 252/17 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum 'Grøna leiðin' hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirkesemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:

1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

# 253/17 Setanarheimild í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 241/17 | 17/03355-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | | | 17/03355-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 253/17 | 17/03355-1 |

**Málslýsing:**
Mælt verður til at dagføra starvsfólkareglugerðina hjá Tórshavnar kommunu, soleiðis at reglugerðin verður sum ásett niðanfyri:

## Tilmæli til soljóðandi starvsfólkareglugerð fyri Tórshavnar kommunu

1. Heimildin til setan, uppsøgn, góðkenning av starvslýsingum og undirskriving av setanarprógvi, uppsagnarskrivi ella fráfaringaravtalu er ein og sama heimild. Heimildin hevur hereftir heiti: Setanarheimild.
2. Býráðið hevur setanarheimildina til **Kommunustjóran**.
   *Mannagongdir: Býráðið velur ein setanarbólk. Í honum sita borgarstjórin, 2 býráðslimir og 1 – 2 óheftir ráðgevar uttan fyri umsitingina.. Setanin verður framd av Býráðnum, eftir tilmæli frá setanarbólkinum.*
3. Borgarstjóri saman við Kommunustjóra hava setanarheimildina til **fyrisitingarstjórar** og **stovnsleiðarar,** sum vísa til kommunustjóran, í semju. At rokna sum stovnsleiðari undir kommunustjóranum eru eisini Leiðarin á Sløkkiliðsstøðini og Havnarmeistarin í Tórshavnar Havn
4. Borgarstjóri saman við kommunustjóra hava setanarheild til **tænastumenn** í semju.
5. Kommunustjóri saman við avvarandi stjóra hava setanarheimildina til **Heilsu- og Umsorganarstjóra, deildarleiðarar** og **stovnsleiðarar**, **sum vísa til fyrisitingarstjóran**, í semju.
6. Fyrisitingarstjóri saman við avvarandi deildarleiðara ella Heilsu- og Umsorganarstjóra, hava setanarheimildina til **starvsfólk, eindarleiðara í Heilsu og Umsorganartænastuni** og **stovnsleiðarar, sum vísa til deildarleiðarar ella Heilsu- og Umsorganarstjóra,** í semju.
7. Kommunustjóri, avvarandi fyrisitingarstjóri, Heilsu- og Umsorganarstjóri, avvarandi eindarleiðari í Heilsu og Umsorganartænastuni ella avvarandi deildarleiðari saman við stovnsleiðari hava setanarheimild til **starvsfólk á stovnum** í semju.
8. Avvarandi fyrisitingarstjóri kann delegera setnanarheimild til **formenn og bólkaleiðarar undir deildar- og stovnsleiðarum og til deildar- og stovnsleiðarar í Heilsu og Umsorganartænastuni**. Hereftir hava hesi setanarheild í semju við sín nærmasta leiðara.
9. Kommunustjóri, fyrisitignarstjórar, deildarleiðarar, Heilsu- og Umsorganarstjóri, eindarleiðarar í Heilsu og Umsorganartænastuni og stovnsleiðarar hava setanarheimild til **starvsfólk í fyribils starvi upp til 3 mánaðar ella til tímalønt starvsfólk.**
10. Fíggjarnevndin verður kunnað um setan av fyrisitingarstjórum, deildarleiðarum, Heilsu- og Umsorganarstjóra, eindarleiðarum í Heilsu og Umsorganartænastuni og stovnsleiðarum.

Starvslýsingar sum ikki fylgja ásettum frymli frá starvsfólkadeildini, skulu góðkennast av starvsfólkadeildini.

**Tilmæli:** Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og starvsfólkaleiðarin mæla til at dagføra starvsfólkareglugerðina hjá Tórshavnar kommunu, sambært §5 stk. 4 í Kommunustýrislógini. Galdandi starvsfólkareglugerð varð samtykt í 2000 (Jrn. nr. 200000247)

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Málið umrøtt og útsett til eyka fíggjarnevndarfund.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Tikið av skrá.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>26. oktober 2017 | Blað nr.: 78<br><br>Formansins merki: |

## 254/17 Fyrisitingarstjórin sigur seg úr starvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 240/17 | 17/03256-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 254/17 | 17/03256-1 |

**Málslýsing:**
Ingunn Eiriksdóttir boðar frá, at hon sigur seg úr starvi frá 1. desember 2017.

Vísandi til samtykt frá fíggjarnevndarfundi 15. juni 2000 skal uppsøgnin verða løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið til viðgerðar, tá stjóri sigur seg úr starvi.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka uppsøgnina til eftirtektar og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Tikið til eftirtektar.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |